# Avgerð Kappingarráðsins tann 20. apríl 2023



# Føroya Tele hevur misnýtt ráðandi støðu í sambandi við útlutan av gávu á 100 GB

Kappingareftirlitið

Mál nr. 21/00313

20. apríl 2023

Skálatrøð 20 · Boks 73 110 Tórshavn · Tlf.: +298 356040 · Fax: +298 356055 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

# Yvirlit

Avgerð Kappingarráðsins tann 20. apríl 2023 ........ 0
1 Samandráttur ........ 3
1.1 Avgerð ........ 3
2 Málslýsing ........ 4
2.1 Bakstøði ........ 5
2.1.1 Føroyska fjarskiftisvinnan ........ 5
2.1.2 Smásøla av fartelefoni í Føroyum ........ 9
2.2 Partarnir ........ 12
2.2.1 Føroya Tele Samtakið ........ 12
2.2.2 P/f Nema ........ 14
2.3 Klagan ........ 15
2.4 Hoyring ........ 16
2.4.1 Hoyringssvar frá Sókn Advokatum ........ 16
2.4.1.1 Viðkomandi marknaður ........ 16
2.4.1.2 Lýsing av fjarskiftismarknaðinum ........ 17
2.4.1.3 Støðan hjá P/f Nema og P/f FT Samskifti á marknaðinum ........ 18
2.4.1.4 Viðgerð av upplýsingum frá eftirlitsvitjanini á Føroya Tele ........ 19
2.4.2 Memorandum frá White Label Consulatancy ........ 19
2.4.2.1 Allýsing av misnýtslu eftir §11 ........ 20
2.4.2.2 Manglandi kanning av útihýsingarváðanum ........ 21
2.4.2.3 Gávan er einans vanlig marknaðarmenning ........ 22
2.4.2.4 Gávan var eitt aftursvar uppá Datarull ........ 22
2.4.3 Framløga á fundi í Kappingarráðnum ........ 23
3 Meting ........ 24
3.1 Grein 11 í kappingarlógini ........ 24
3.2 Viðkomandi marknaður ........ 24
3.2.1 Viðkomandi vørumarknaður ........ 24
3.2.2 Viðkomandi landafrøðiligi marknaður ........ 26
3.2.3 Ávegis niðurstøða um viðkomandi marknaðir ........ 26
3.3 Ráðandi støða ........ 26
3.3.1 Marknaðarstøðan hjá ráðandi fyritøkuni og hjá kappingarneytum ........ 27

3.3.2 Hóttan um víðkan av útboði og innrás á marknaðin ... 30
3.3.3 Tingingarmegi hjá kundum ... 31
3.3.4 Ávegis niðurstøða ... 32
3.4 Misnýtsla ... 32
3.4.1 Predatory pricing ... 35
3.4.1.1 Útrokningarnar ... 37
3.4.1.2 Negativur markvinningur ... 39
3.4.1.3 Lønsemi ... 41
3.4.1.4 Offur ... 42
3.4.1.5 Ávegis niðurstøða ... 43
3.4.2 Annar útihýsandi atburður ... 44
3.4.2.1 Samskifti og annað tilfar frá Føroya Tele ... 45
3.4.2.2 Útihýsandi framferð í mun til P/f Nema ... 53
3.4.2.3 Útihýsandi framferð í mun til møguligar nýggjar kappingarneytar ... 55
3.4.2.4 Ávegis niðurstøða ... 56
4 Niðurstøða ... 58
4.1 Kæruvegleiðing ... 58

# 1 Samandráttur

1. P/f Nema kom tann 18. apríl 2018 við ókeypis ískoytistænastu til privatu fartelefoni haldini, ið merkti, at teirra kundar fingu møguleikan at flyta óbrúkt data til næsta mánað.

2. P/f FT Samskifti kom tann 25. apríl 2018 við eini gávu til allar verandi Ver kundar og nýggjar kundar. Gávan var 100GB av data at brúka fram til árslok. Einasta treyt var, at brúkarin ikki skifti yvir til eitt hald við minni data í tíðarskeiðinum gávan hevði gildi.

3. Gávan frá P/f FT Samskifti hevði við sær, at P/f Nema varð tvingað til eisini at lata eina gávu fyri ikki at missa kundar. Gávan frá P/f Nema varð latin tann 27. apríl 2018 og hevði ta avleiðing, at ókeypis ískoytistænastan longu frá byrjan var óviðkomandi, tí allir brúkarar høvdu eina yvirflóð av data hvønn mánað fram til árslok.

4. P/f Nema klagaði til Kappingareftirlitið tann 6. juni 2018 fyri at hava brúkt ránsprísir í gildistíðini, og tí hevði framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

5. Kappingareftirlitið boðaði Føroya Tele frá tann 26. november 2020, at eftirlitið sá trý kappingarlig ivamál í sambandi við gávuna. Í fyrsta lagi um talan var um ránsprísir, í øðrum lagi um talan var um aðra útihýsandi framferð, har Føroya Tele hevði roynt at revsa P/f Nema fyri at koma við ókeypis tænastuni, og í triðja lagi, um gávan hevði havt ta avleiðing at hindra atgongd til marknaðin í gildistíðini og frameftir.

6. Kappingareftirlitið hevur skilmarkað viðkomandi marknað sum privat fartelefoni hald buntað við talu, sms og data í Føroyum.

7. Kappingareftirlitið metir, grundað á eina samlaða meting av verandi útboði, møguleikan fyri øktum útboði, og møguligari tingingarmegi hjá kundum, at P/f FT Samskifti hevði eina ráðandi støðu á viðkomandi marknaði í 2018.

8. Kappingareftirlitið metir, at P/f FT Samskifti hevur ikki brúkt ránsprísir í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini, men metir, at P/f FT Samskifti hevur framt annan útihýsandi atburð í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

## 1.1 Avgerð

9. Kappingarráðið hevur tikið avgerð um at:
   - P/f FT Samskifti hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini í sambandi við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018. Tí talan var um eitt aftursvar, sum var grundað á fíggjarliga megi og ta søguliga støðu, sum felagið hevur á marknaðinum, heldur enn á kappingarligar grundaðar fyrimunir[1].
   - P/f FT Samskifti hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini í sambandi við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018, tí avleiðingin var, at atgongdin til marknaðin varð hindrað í gildistíðini og avmarkað frameftir.

[1] Competition on the merits

## 2 Málslýsing

10. Kappingareftirlitið fekk tann 6. juni 2018 eina klagu frá Petur Even Djurhuus, advokati, sum vegna P/f Nema klagaði P/f FT Samskifti fyri at brúka ránsprísir í stríð við § 11 í kappingarlógini[2].

11. Klagað varð um, at P/f FT Samskifti hevði latið eina gávu tann 25. apríl 2018. Gávan var 100 GB av data at brúka fram til árslok. Gávan varð latin øllum verandi Ver-kundum og nýggjum Ver-kundum, sum komu áðrenn 30. juli 2018. P/f Nema var av teirri áskoðan, at P/f FT Samskifti hevði selt til undir kostnað í tíðarskeiðinum gávan var í gildi.

12. Í klaguni frá P/f Nema varð sagt, at gávan var eitt aftursvar uppá eitt marknaðarátak, sum P/f Nema byrjaði tann 18. apríl 2018, tá felagið kom við tænastuni Datarull.

13. Datarull var ein ókeypis ískoytistænasta, sum loyvdi privatum fartelefoni brúkarum hjá P/f Nema at flyta óbrúkt data til næsta mánað. Brúkarar hjá P/f Nema kundu sostatt spara upp data til framtíðar nýtslu, heldur enn at gjalda fyri eyka áfyllingar.

14. Tann 20. apríl 2018 kom P/f Nema við eini sjálvavgreiðslu, Mítt Hey, sum gav brúkarum møguleika at avgreiða teirra kundaviðurskifti við P/f Nema umvegis alnetið.

15. Marknaðarátakið endaði tann 24 apríl við, at P/f Nema kom við átakinum "Bjóða við", sum gav kundum hjá P/f Nema møguleika, at fáa 4GB av data fyri hvønn nýggjan fartelefoni kunda teir heintaðu til P/f Nema. Nýggi kundin fekk eisini 4GB av data.

16. Tann 25. apríl 2018 almannakunngjørdi P/f Samskifti á Facebook, at allir verandi og nýggir kundar fóru at fáa 100 GB av data ókeypis at brúka fram til 31. desember 2018. Grundgevingin var, at vørumerkið VER gjørdist 4 ár[3,4,5].

17. P/f Nema varð nú tvingað til at lata líknandi gávu, tí annars varð vandi fyri, at felagið fór at missa nógvar kundar til P/f Samskifti. Sum støðan var tann 25. apríl 2018, so kundi ein kundi hjá P/f Nema, sum rindaði 289 kr. fyri 15 GB um mánaðin, skifta yvir til eitt 0GB hald hjá P/f FT Samskifti og fáa 100GB av data, ið svaraði til 12,5GB um mánaðin, fyri 189 kr. um mánaðin.

18. Tí almannakunngjørdi P/f Nema tann 27. apríl 2018, at øll verandi og nýggj hald, sum vóru stovnað áðrenn 31. juli, fóru at fáa millum 100-300 GB í gávu. Støddin á gávuni varð sett í mun til hvussu nógv GB vóru í haldinum, og gávan var at deila millum allar brúkarar í haldinum.

19. Endaliga avleiðingin var tí, at tað var yvirflóð av data á marknaðinum frá 25. apríl 2018 fram til ársenda 2018. Hetta hevði við sær, at tænastan, Datarull, var óviðkomandi longu frá byrjan og fram til árslok 2018.

20. Kappingareftirlitið metti, at framferðin hjá P/f FT Samskifti tann 25. apríl 2018 hevði ta avleiðing, at kappingin varð avmarkað í 8 mánaðir, og at tað var ein gruni um, at P/f FT Samskifti hevði brúkt ránsprísir.

---

[2] Skjal 18/00268-1: Kæra um prísdumping
[3] VER (25.04.2018). 100 GB av data ókeypis. Facebook. https://www.facebook.com/verforoyar/posts/1567744469941100
[4] KE-DE0011: Teldupostur. 25. apríl 2018, kl. 09:42, brúkari: [.......]
[5] KE-DE0011: Teldupostur. 25. apríl 2018, kl. 11:09, brúkari: [.......]

21. Kappingareftirlitið avgjørdi tí tann 18. oktober 2019 at senda eina fráboðan um kappingarlig ivamál til P/f FT Samskifti um møguligt brot á § 11 í kappingarlógini. Aftaná eina nærri gjøgnumgongd av veruligu upplýsingunum í málinum, avgjørdi Kappingareftirlitið tann 26. november 2020 at senda eina broytta fráboðan um kappingarlig ivamál til P/f FT Samskifti um møguligt brot á § 11 í kappingarlógini[6].

22. Í broyttu fráboðanini varð víst á trý kappingarlig ivamál. Í fyrsta lagi um P/f FT Samskifti hevði brúkt ránsprísir, í øðrum lagi hvørt gávan var egnað til at tukta verandi kappingarneyta til ávísan atburð, og í triðja lagi um gávan var egnað til at forða øðrum at koma inn á marknaðin meðan og eftir gildistíðina.

## 2.1 Bakstøði

### 2.1.1 Føroyska fjarskiftisvinnan

23. Føroya Tele hevði lógarmonopol at selja fjarskiftistænastur í Føroyum fram til 1. juli 1997, tá ein nýggj lóg um fjarskifti kom í gildi.[7] Nýggja lóggávan gav øðrum møguleika at selja fjarskiftistænastur. Føroya Tele fekk sín fyrsta kappingarneyta í 1999, tá fyritøkan Teletænastan byrjaði at selja breiðband. Klagarin, P/f Nema, kom á marknaðin í 2000.[8]

24. Á myndini niðanfyri síggjast føroyska og danska brúkaraprístalið og prístalið fyri fjarskiftistænastur í báðum londum nøkur ár eftir liberaliseringina í Føroyum og fram til 2018.

*Mynd 2-1: Gongdin á brúkaraprísum og prísum á fjarskiftistænastum árini 2001 til 2018*




Kelda: Hagstova Føroya, talva IP02021 Brúkaraprístalið, skift á vøru- og tænastubólkar, Danmark Statistik, talva: PRIS111: Forbrugerprisindeks (2015=100) efter varegruppe og enhed

25. Danska brúkaraprístalið er støðugt hækkað í øllum tíðarskeiðinum. Føroyska brúkaraprístalið er eisini hækkað í tíðarskeiðinum, men frá 2008 til 2009 og frá 2013 til 2016 fall prístalið.

26. Prístalið fyri fjarskiftistænastur er fallið í báðum londum síðani 2001. Føroyska prístalið fall mest fyrstu árini eftir liberaliseringina, meðan danska prístalið er fallið støðugt alt tíðarskeiðið. Tað eru

[6] Skjal 18/00268-7 og skjal 18/00268-28
[7] Løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti
[8] https://nema.fo/sogan/

tíðarskeið, har føroyska prístalið fyri fjarskiftistænastur hevur verið konstant yvir fleiri ár, ið er ein ábending um vantandi prískapping.

27. Nøkur viðurskifti draga kostnaðin í Føroyum uppeftir í mun til Danmark, onnur niðureftir. Nevnast kann, at fólkatalið er lægri, fólkatættleikin er minni og nýtslan er øðrvísi, tí lutfalsliga nógv arbeiða uttanfyri landoddarnar. Á hin bógvin dregur, at lønarstøðið er lægri og spektrum er bíligari.

28. Á talvuni niðanfyri sæst parturin hjá Føroya Tele av samlaðu søluni innan fastnet, fast breiðband, farnet og fleirrás sjónvarp.

*Talva 2-1: Marknaðarpartar hjá Føroya Tele á høvuðsvirkisøkjunum árini 2005 til 2020*

| Hald | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fastnet | 79 | 80 | 79 | 80 | 80 | 81 | 83 | 80 | 83 | 83 | 83 | 81 | 83 | 82 | 82 | 82 |
| Fast Breiðband | 67 | 69 | 70 | 71 | 75 | 74 | 78 | 78 | 78 | 78 | 77 | 77 | 77 | 78 | 79 | 80 |
| Farnet | 71 | 69 | 68 | 66 | 65 | 66 | 68 | 69 | 70 | 71 | 72 | 73 | 74 | 75 | 75 | 76 |
| Fleirrás sjónvarp | 38 | 44 | 48 | 54 | 58 | 61 | 62 | 64 | 73 | 76 | 78 | 79 | 73 | 71 | 76 | 76 |

Kelda: Hagtøl Fjarskifti, Fjarskiftiseftirlitið, tikið av https://www.fjarskiftiseftirlitid.fo/fo/kunning/hagtoel

29. Sum tað framgongur av talvuni omanfyri, hevur Føroya Tele ongantíð havt ein marknaðarpart niðanfyri 70% innan høvuðsøkini síðani 2013, og í flestu førum er støðan styrkt seinastu árini.

30. Strikumyndin niðanfyri vísir árligu smásøluna á føroyska fjarskiftismarknaðinum og lutfalsliga partin hjá P/f Nema av samlaðu smásøluni í tíðarskeiðinum 2001 til og við 2017.

*Mynd 2-2: Gongdin í smásøluni av fjarskiftiustænastum og marknaðarpartur hjá P/f Nema árini 2001 til 2017*




Kelda: P/f FT Samskifti, P/f Nema, Fjarskiftiseftirlitið

31. Fyrivarni skal takast fyri at tølini fyri árini 2001 til 2004 eru tikin úr roknskapinum hjá P/f Telefonverkinum, tí smásølan var ikki útskild í egið partafelag um hetta mundi. Raksturin hjá P/f Telefonverkinum fevndi eisini um annað virksemi sum heilsølutænastur, sjónvarpskervið og sjókaðlar.

32. Sambært strikumynd 2.2, var samlaða smásølan áleið [....] mió. kr. í 2001. Fram til 2013 hækkaði smásølan til [....] mió.kr. Síðani er samlaða smásølan lækkað javnt og støðugt og við árslok 2017

var smásølan [....] mió. kr. Samlaða smásølan er sostatt fallin við [....] mió. kr. í tíðarskeiðinum 2013 til 2017.

33. Í 2001 var parturin hjá P/f Nema [0-10]% av samlaðu smásøluni, men parturin av samlaðu søluni hjá P/f Nema hækkaði fram til 2009, tá P/f Nema átti [20-30]% av samlaðu søluni. Síðani er parturin hjá P/f Nema støðugt lækkaður og var [20-30]% í 2017.

34. Sølan var tó størst í krónum í 2008, tá felagið seldi fyri [....] mió. kr. Í tíðarskeiðinum 2008 til 2017 fall smásølan hjá P/f Nema við [....] mió. kr., meðan smásølan hjá P/f FT Samskifti fall við [....] mió. kr. Sostatt misti P/f FT Samskifti einans [0-10]% av smásøluni, meðan P/f Nema misti [20-30]% av síni smásølu í sama tíðarskeiði.

35. Strikumyndirnar niðanfyri vísir smásøluna hjá P/f Samskifti og P/f Nema innan høvuðsvirkisøkini fartelefoni, breiðband, fastnet telefoni og handlar.

*Mynd 2-3: Sølan hjá P/f FT Samskifti og P/f Nema innan høvuðsvirkisøkini árini 2012 til 2017*




Kelda: P/f FT Samskifti, P/f Nema, Fjarskiftiseftirlitið

36. Sølan av fastnet telefoni og fartelefoni lækkaði í tíðarskeiðinum 2012 til og við 2017. Sølan av fastnet telefoni lækkar, tí talan er um eina tænastu, sum er við at ganga út ella sum í øllum førum tann breiði skarin av kundum ikki fer at hava. Sølan av breiðbandi og sølan hjá handlum er hækkað í tíðarskeiðinum.

37. Sølan hjá báðum pørtum av fartelefoni lækkaði frá 2012 til 2017, men afturgongdin hjá P/f Nema hevur verið munandi størri enn hjá P/f FT Samskifti. Í tíðarskeiðinum lækkaði sølan av fartelefoni hjá P/f Nema við 36 prosentstig meðan sølan hjá P/f FT Samskifti er einans lækkað við 9 stigum.

38. Søla av fartelefoni er høvuðsvirkisøkið hjá P/f Nema. Í 2017 komu 50-60% av søluni hjá P/f Nema frá sølu av fartelefoni[9,10]. Til samanberingar komu 20-30% av søluni hjá Føroya Tele samtakinum frá sølu av fartelefoni[11],[12].

39. Hóast smásølan hjá báðum feløgum innan breiðband og handlar er hækkað í tíðarskeiðinum, so hevur hetta ikki uppvigað lækkingina í smásøluni av fartelefoni og fastnet telefoni. Tí er avkastið innan smásølu á føroyska marknaðinum í hesum tíðarskeiði lækkað.

40. Stabbamyndin niðanfyri vísir ROIC hjá ávikavist P/f Nema og P/f Føroya Tele í tíðarskeiðinum 2013 til og við 2017 og altjóða miðal.

*Mynd 2-4: ROIC fyri P/f Samskifti og P/f Nema árini 2013 til 2017*




Kelda: P/f Nema, P/f FT Samskifti

41. Avkøstini á føroyska marknaðinum vóru hægri enn altjóða miðal i 2013. P/f Nema hevði eitt avkast á 21,3%, meðan P/f FT Samskifti hevði eitt avkast á 37,2%. Altjóða miðal í 2013 var 9,7%. Í 2014 hækkaðu avkøstini hjá bæði P/f Nema og P/f FT Samskifti, meðan altjóða miðal lækkaði. Avkastið hjá P/f Nema var áleið 4 ferðir altjóða miðal, meðan avkastið hjá P/f FT Samskifti var áleið 7 ferðir altjóða miðal.

42. Síðani 2014 er avkastið hjá P/f Nema lækkað á hvørjum ári og avkastið hjá P/f FT Samskifti er eisini lækkað í tíðarskeiðinum. Í 2017 var avkastið hjá P/f Nema niðanfyri altjóða miðal, meðan avkastið hjá P/f FT Samskifti var lægri, men var framvegis meira enn tvær ferðir altjóða miðal.

---

9 Virkisøkisroknskapur hjá P/f Nema fyri 2017
10 Ársroknskapur hjá P/f Nema fyri 2017
11 Virkisøkisroknskapur hjá P/f FT Samskifti fyri 2017
12 Ársroknskapur hjá P/f Telefonverkið

43. Munurin á avkøstunum hjá feløgunum kann koma av stórrakstri[13], fleriframleiðslu[14], betri innlit í marknaðin, góð kunda sambond, men kann eisini stava frá kappingarligum trupulleikum.

### 2.1.2 Smásøla av fartelefoni í Føroyum

44. Við ársbyrjan 2018 vóru 56.293 fartelefoni hald í Føroyum, av hesum vóru 42.351 privat hald og 13.942 vinnu hald[15].

45. Í 2017 avroknaðu føroysku fartelefoni feløgini 172.504.000 minuttir og av hesum vóru 146.601.000 brúktir av fartelefonum og 25.903.000 minuttir vóru brúktir av fastnet telefonum.[16]

46. Av samlaðu avroknaðu minuttinum innan fartelefoni, vórðu 94.452.000 minuttir brúktir á privatum haldum og 52.149.000 minuttir á vinnuhaldum.

47. Á strikumyndini niðanfyri sæst gongdin á nýtsluni innan fastnet og farnet.

*Mynd 2-5: Útgangandi innlendis ferðsla og útgangandi uttanlandsferðsla á fast- og farneti.*




Kelda: Hagtøl Fjarskifti, Fjarskiftiseftirlitið, tikið av https://www.fjarskiftiseftirlitid.fo/fo/kunning/hagtoel

48. Seinastu mongu árini er nýtslan innan fartelefoni áhaldandi hækkað, samstundis sum nýtslan av fastnet telefoni er áhaldandi lækkað.

49. Lækkingin í minuttum á fastnetinum er ikki heilt uppvigað av hækkingini í minuttum á farnetum, uttan iva tí, at samskiftið í ávísan mun er flutt yvir á aðra tøkni, sum t.d. IM-tøkni.

50. Í 2018 og framvegis í dag, er óavmarkað nýtsla av talutíð íroknað í prísin á einum fartelefoni haldi, meðan tal av brúkarum og nøgd av data, avgerð prísin.

[13] Economics of scale
[14] Economics of scope
[15] Fjarskiftiseftirlitið, Fjarskiftishagtøl 2017, Talva 9 - Høvuðsábendingar innan fartelefoni, tikið av www.fse.fo
[16] Fjarskiftiseftirlitið, Fjarskiftishagtøl 2017, Talva 25 - Høvuðsábendingar innan ferðslu, tikið av www.fse.fo

51. Á myndini niðanfyri sæst samlaða árliga talið av sendum SMS-boðum í tíðarskeiðinum 2003 til 2020 og bólkað í vinnu og privat hald.

*Mynd 2-6: Gongdin í nýtsluni av SMS árini 2005 til 2019*




Kelda: Hagtøl Fjarskifti, Fjarskiftiseftirlitið, tikið av https://www.fjarskiftiseftirlitid.fo/fo/kunning/hagtoel

52. Samlaða talið av SMS boðum vaks úr 25 mió. í 2003 til 43 mió. í 2012. Síðani hevur talið av SMS-boðum verið lækkandi. Í 2020 var talið av SMS boðum komið niður á 21. mió. Privata nýtslan av SMS er lækkað úr 30 mió. niður í 15 mió. í tíðarskeiðinum 2013 til 2020, meðan nýtslan hjá vinnuni hevur verið støðug, áleið 6-7 mió. sms árliga, í sama tíðarskeiði.

53. Tað er greitt, at privati brúkarin hevur vent hesi tøkni ryggin og kemur hetta uttan iva av, at tílíkt samskifti er flutt yvir á IM-tøkni.

54. Nýtslan hjá vinnuni er í minni mun til persónar, men millum skipanir og persónar. Talan kann verða um boð frá kundaskipanum til kundar um komandi avtalur. Talan kann eisini verða um innanhýsis trygdarskipanir, sum senda boð, tá onkur hending fer fram.

55. Tey fartelefon høld sum vóru seld á føroyska marknaðinum í 2018, høvdu altíð óavmarkað tal av SMS við í prísinum. Tað var tal av brúkarum og nøgd av data, sum var avgerandi fyri prísin.

56. Á strikumyndini niðanfyri sæst nýtslan av farbreiðbandi árini 2007 til og við 2020.

*Mynd 2-7: Samlaða nýtslan av fardata og bólka í vinnu og privat - árini 2007 til 2019*




Kelda: Hagtøl Fjarskifti, Fjarskiftiseftirlitið, tikið av https://www.fjarskiftiseftirlitid.fo/fo/kunning/hagtoel

57. Nýtslan av farbreiðbandi var 130.000 GB í 2007 og síðani hækkaði nýtslan spakuliga fram til 2015, tá var hon 110 mió. GB. Frá 2015 til 2019 hækkaði nýtslan úr 110 mió. GB til 6. mia. GB.

58. Nýtslan av farbreiðbandi fer væntandi at halda áfram at vaksa komandi árini, so hvørt sum tólnet-tøkni[17] verður at finna í alt fleiri tólum hjá tí privata og í vinnulívinum.

59. Tey hald, sum vóru til sølu í 2018, vóru sokalla familjuhald. Talan er í grundini um eina avsláttarskipan, har haldið gerst lutfalsliga bíligari tess fleiri familjulimir eru og tess meira data verður keypt.

60. P/f Samskifti seldi síni hald undir VER-vørumerkinum, sum eisini fevndi um eina sjálvavgreiðslu.

61. Áðrenn apríl 2018 vórðu hald hjá P/f Nema seld undir RED-vørumerkinum. Marknaðarátakið, sum P/f Nema byrjaði í apríl 2018, hevði til endamál at innføra Hey-vørumerki og eina sjálvavgreiðslu undir sama heiti.

62. Í talvuni niðanfyri sæst ein sundurliðing av familjuhaldunum sum P/f FT Samskifti bjóðaði fram í 2018.

*Talva 2-2: Sundurliðing av haldunum hjá FT Samskifti í 2018*

| Hald | Brúkari 1 | Brúkari 2 | Brúkari 3 | Brúkari 4 | Brúkari 5 | Brúkari 6 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ver 0GB | 157 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |
| Ver 6GB | 247 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |
| Ver 16GB | 297 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |
| Ver 26GB | 347 | 117 | 47 | 17 | 17 | 17 |

Kelda: Føroya Tele

[17] IoT, Intermet of things

63. Tað er afturvendandi í øllum haldum, at fyrsti brúkarin rindar "fullan" prís, sum er ásettur í mun til nøgdina av data á haldinum. Aðrir brúkarar í haldinum rinda ein "niðursettan" prís, sum er óheftur av nøgdini av data. Niðursetti prísurin verður ásettur í mun til hvar í røðini av brúkarum ávísi brúkarin er.

64. Tað skal viðmerkjast, at kundin sær ikki hesa sundurliðing í sambandi við keyp av haldi. Kundin ásetur tal av brúkarum í haldinum og nøgdina av data á haldinum. Brúkararnir á haldinum hava ikki felags data. Tí má kundin hava í huga, hvør tørvurin er hjá brúkaranum, sum hevur størstu nýtsluna ella rinda fyri eyka áfyllingar.

65. Í 2018 høvdu flest familjuhald hjá VER 6GB av data, ið kostaði 247 kr. fyri ein brúkara. Hetta svarar til 42 kr. fyri GB. Var talan um eitt hald við tveimum brúkarum, varð rindað 247+117 kr. fyri haldið. Hetta svarar til áleið 20 kr. fyri GB. Báðir brúkarar í haldinum høvdu óavmarkaða talutíð og kundu senda óavmarkað tal av sms boðum.

66. Prísásetingin av einum 26GB haldi fór fram eftir somu meginreglu, men kostnaðurin fyri GB var lægri. Var ein brúkari á haldinum, var kostnaðurin 13 kr. fyri hvørt GB, vóru tríggir brúkarar, var prísurin 5 kr. fyri GB.

67. Kappingareftirlitið metir, at prísásetingin avmarkar flytføri[18] á marknaðinum, men hevur ikki tikið støðu til um avsláttarskipanin er í stríð við § 11 í kappingarlógini.

68. Sum framgongur av talvu 2.1 undir parti 2.1.1. so hevur marknaðarparturin hjá P/f FT Samskifti síðani 2013 ongantíð ligið undir 70%. Vandin fyri kappingina við slíkum haldum er, at ráðandi fyritøkan fær møguleika at knýta samband til børn og ung áðrenn tey gerast sjálvstøðugir brúkarar.

69. Tá hevur ráðandi fyritøkan ein fyrimun í kappingini um nýggjar kundar.

70. Virksemið á Facebook vanganum hjá VER er eisini í serliga mun rættað ímóti yngra skaranum.

## 2.2 Partarnir

### 2.2.1 Føroya Tele Samtakið

71. Móðurfelagið í Føroya Tele samtakinum er P/f Telefonverkið, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin.

72. Móðurfelagið hevur sín uppruna í almenna stovninum Telefonverk Føroya Løgtings, sum hevði lógarmonopol innan fjarskifti í Føroyum. Í sambandi við liberaliseringina, sum fór fram í 1997, varð virksemið hjá Telefonverk Føroya Løgtings lagt í partafelagið P/f Føroya Telefonverkið.

73. So hvørt sum kappingin tók seg upp í smásølu liðinum var greitt, at tað var ein trupulleiki, at P/f Føroya Tele var heilsølu monopol, samstundis sum felagið var í kapping í smásølu liðinum.

74. Loysnin var ein løgfrøðilig sundurskiljing, soleiðis at heilsøluparturin varð lagdur í eitt dótturfelag P/f FT NET, meðan smásølan varð løgd í annað dótturfelag, P/f FT Samskifti. Tó var tað undantakið gjørt, at farnetið varð lagt í P/f FT Samskifti. Grundgevingin var, at kappingarneytin P/f Nema eisini hevði eitt farnet.

[18] á donskum: mobilitet

75. Kappingareftirlitið og Fjarskiftiseftirlitið vóru ímóti hesi loysn. Eftirlitini á Skálatrøð ynsktu og ynskja framvegis eina fulla sundurskiljing, t.v.s. at heilsølan og smásølan skulu ikki verða í sama samtaki.[19]

76. Í myndini niðanfyri sæst yvirlit yvir feløgini í Føroya Tele samtakinum í 2018, umframt feløg, har Føroya Tele var minniluta eigari. Somuleiðis er eitt yvirlit yvir leiðslubygnaðin í samtakinum í 2018.

*Mynd 2-8: leiðslu- og samtaksbygnaður í Føroya Tele í 2018*




Kelda: Ársroknskapur hjá Føroya Tele fyri 2018

77. Samtaksleiðslan er mannað av samstaksstjóra, stjórum í dótturfeløgunum og deildarstjórum.

78. Tað innanhýsis samskifti, sum Kappingareftirlitið hevur fingið innlit í, vísir týðiliga eina flata organisatión, har samtaksleiðslan luttekur í dagligu leiðsluni av dótturfeløgum og tekur avgerð í konkretum viðurskiftum hjá dótturfeløgum.

79. Í samband við aftursvarið til Datarull, luttóku partar av samtaksleiðsluni í allari viðgerðini. [Deildarstjórin] fekk til uppgávu frá [ovastu leiðslu] at koma við einum aftursvari. [Leiðslupersónar] í FT Samskifti tóku bert í avmarkaðan mun lut í tí fundarvirksemi og samskifti, sum var um Datarull og luttóku bert í avmarkaðan mun í tilgongdini at tilevna eitt aftursvar.

80. Sama var galdandi, tá FT Samskifti hækkaði prísin á fartelefon haldum í november 2018. Tað var [deildarstjórin], sum hevði uppgávuna undir hond. [Deildarstjórin], [Leiðslan] á P/f FT Samskifti og [persónur í ovastu leiðslu] samskifti um uppgávuna, men loysnin varð løgd fyri samtaksleiðsluna.

[19] Kervisfrágreiðingin – ein kanning av bygnaðinum á føroyska fjarskiftismarknaðinum við Føroya Tele sum høvuðskervisveitara og tænastuveitara, 22. oktober 2004

81. Niðanfyri eru roknskaparlig lyklatøl fyri Føroya Tele samtøkuna fyri tíðarskeiðið 2016 til 2020 og ein sundurliðing av nettosøluni í 2017.

*Talva 2-3: Lyklatøl fyri Føroya Tele árini 2016 til 2020 og sundurliðing av nettosøluni fyri 2017*

| Samtak - mió. kr. | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | 475 | 488 | 380 | 385 | 390 |
| EBITDA | 128 | 135 | 114 | 109 | 102 |
| Ársúrslit | 44 | 53 | 48 | 33 | 31 |
| | | | | | |
| Eginpeningur | 459 | 509 | 538 | 533 | 530 |
| Fíggjarjavni | 780 | 754 | 726 | 711 | 766 |
| | | | | | |
| Ársverk | 246 | 249 | 178 | 179 | 183 |




Kelda: Ársroknskapur fyri Føroya Tele fyri 2020 og 2016, virkisøkisroknskapur fyri 2017

82. Føroya Tele samtakið hevur í tíðarskeiðinum 2016 til 2020 havt eina miðal nettosølu á 423 mió. kr. og eitt miðal ársúrslit á 41 mió. kr. Í 2017 komu umleið [20-30]% av nettosøluni hjá Føroya Tele frá smásølu av fartelefoni.

83. P/f Net, ið er heilsølan í samtakinum, hevði í sama tíðarskeiði eina miðal nettosølu á 108 mió. kr. og eitt miðal ársúrslit á 6 mió. kr.

84. Ongin kann trína inn á ein fjarskiftismarknað, uttan at hava eina avtalu við P/f Net ella umvegis ein triðja part, sum hevur avtalu við P/f Net.

85. P/f Samskifti hevur smásøluna um hendi og heilsølu av farneti. P/f FT Samskifti hevði í sama tíðarskeiði eina miðal nettosølu á [.....] mió. kr. og eitt miðal ársúrslit á [....] mió. kr. [20]

86. P/f Shefa og Shefa Telecom Ltd. selja kapasitet á SHEFA-2 kaðalinum, ið knýtir Føroyar, Hetland, Orknoyggjar og Skotland saman og Cantat-3, sum knýtir Ísland, Føroyar, Danmark og Týskland saman. P/f Shefa hevur eisini møguleika at selja kapacitet á øðrum kaðalum, sum knýta Ísland, Føroyar og Skotland saman og millum Ísland og Danmark.[21]

87. P/f Televarpið selur fleirrássjónvarp og hevur monopol til at senda signal hjá almenna sjónvarpinum Kringvarp Føroyar.

### 2.2.2 P/f Nema

88. Í 2019 løgdu feløgini P/f Nema og P/f Hey saman. P/f Nema hevði virksemi innan hardware, software menning, skrivstovu útgerð, skrivstovu tilfar, prent v.m. P/f Hey var fjarskiftisveitari og var úrslit av eini samanlegging millum P/f Kall og P/f Tele F í 2001.

89. Í 2008 broytti P/f Kall navn til Vodafone Føroyar eftir at íslendska Vodafone hevði keypt felagið. Í 2018 seldi Vodafone Ísland sín ognarlut í føroyska felagnum til føroyskar íleggjarar og varð navnið tá broytt til P/f Hey.

90. Aftaná samanleggingina í 2019, avgjørdu nýggju eigararnir, at samanlagda felagið skuldi virka undir P/f Nema navninum, meðan Hey bleiv brúkt sum vørumerki fyri fjarskiftisvirksemið.

[20] Skjal 21/00313-29: Upplýsingar um nettosølu árini 2017 til 2021
[21] www.shefa.fo

91. Niðanfyri eru roknskaparlig lyklatøl fyri P/f Nema, umframt ein sundurliðing av nettosøluni hjá felagnum.

*Talva 2-4: Lyklatøl fyri P/f Nema og sundurliðing av nettosøluni millum fartelefoni og annað í 2017.*

| P/f Nema - mió. kr | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bruttoúrslit | 26 | 24 | 26 | 51 | 48 |
| EBITDA | 5 | 5 | 6 | 18 | 19 |
| Ársúrslit | 2 | 2 | 5 | 10 | 10 |
| | | | | | |
| Eginpeningur | 9 | 11 | 14 | 24 | 32 |
| Fíggjarjavni | 57 | 53 | 54 | 102 | 94 |
| | | | | | |
| Ársverk | 54 | 53 | 52 | 72 | 68 |




Kelda: Ársroknskapur hjá P/f Nema fyri árini 2016 til 2020 og virkisøkisroknskapur fyri 2017

92. Tá raksturin hjá P/f Nema verður samanborin við raksturin hjá Føroya Tele, er greitt, at P/f Nema er meira bundið av at fáa inntøkur frá fartelefoni. Meðan einans [20-30]% av nettosøluni hjá Føroya Tele kom frá fartelefoni í 2017, so koma meir enn [50-60]% av nettosøluni hjá P/f Nema frá fartelefoni sama ár.

93. P/f Nema stendur tí serliga veikt, um møgulig kappingaravlagandi framferð hjá Føroya Tele verður vend ímóti fartelefoni virkseminum.

94. Tað framgongur av mynd 2-3 á síðu 7, so eru inntøkurnar frá fartelefoni lækkaðar seinastu árini, hóast at nýtslan er økt. Hinvegin eru inntøkurnar frá internet og handlum hækkaðar í sama tíðarskeiði. Tað kundi verið ábending um, at Føroya Tele hevur valt at leggja alla orku í at kappast á júst hesum marknaði.

## 2.3 Klagan

95. Klagan frá P/f Nema varð send til Kappingareftirlitið tann 6. juni 2018. Klagarin hevði tikið eina skíggjamynd av vanganum hjá VER á Facebook, har sligið var upp tann 25. apríl 2018, at allir verandi kundar og nýggir kundar, sum komu áðrenn 31. juli 2018, fingu eina gávu á 100 GB av fardata at brúka fram til 31. desember 2018.

96. P/f Nema vísti á, at gávan var eitt aftursvar til ókeypis tænastuna Datarull, sum P/f Nema var komið við tann 18. apríl 2018. P/f Nema metti framferðina hjá P/f Samskifti vera ránsframferð[22] og hevði viðlagt egnar metingar til stuðul fyri klaguni.

97. P/f Nema vísti á, at gávan frá P/f Samskifti hevði tvungið felagið til sjálvt at koma við líknandi gávu, tí annars fóru teir at missa nógvar kundar.

98. P/f Nema metti, at av tí at P/f Samskifti hevði eina ráðandi støðu, so var framferðin brot á kappingarlógina.

99. P/f Nema heitti tí á Kappingareftirlitið um at byrja mál ímóti FT Samskifti um misnýtslu av ráðandi støðu í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

[22] predation

## 2.4 Hoyring

### 2.4.1 Hoyringssvar frá Sókn Advokatum

100. Jógvan E.W. Poulsen, adv. hevur tann 30. desember 2022 latið hoyringssvar vegna Føroya Tele. Í hoyringssvarinum kemur advokaturin inn á skilmarkingina av viðkomandi marknað, lýsingina av føroyska fartelefoni marknaðinum, støðuna hjá P/f Nema og P/f FT Samskifti á marknaðinum, og viðgerð av upplýsingum frá eftirlitsvitjanini á Føroya Tele.

101. Í pørtunum 2.4.1.1 til 2.4.1.4 verða tey viðurskifti, sum advokaturin hevur víst á viðgjørd. Sjálvt hoyringssvarið er at finna sum fylgiskjal 5.3.

#### 2.4.1.1 Viðkomandi marknaður

102. Advokaturin vísir á, at Kappingareftirlitið hevur skrivað, at tað er semja millum Kappingareftirlitið og Føroya Tele um skilmarkingina av viðkomandi marknað. Advokaturin avvísir hesum staðiliga.

103. Á fundi tann 7. november 2019 millum Kappingareftirlitið og umboð fyri Føroya Tele søgdu umboðini, at skilmarkingin av viðkomandi marknað heldur átti at verið fartelefoni hald buntað við SMS, talu og data og ikki data buntað við talu og sms, sum Kappingareftirlitið hevði gjørt í fyrstu fráboðanini um kappingarlig ivamál. Kappingareftirlitið hevur síðani hildið fast um skilmarkingina hjá Føroya Tele. Hetta er orsøkin til, at Kappingareftirlitið hevur hildið, at semja var millum eftirlitið og Føroya Tele um skilmarkingina.

104. Advokaturin vísir á, at tað er álagt Kappingareftirlitinum at gera eina eftirspurnings- og útboðsvaraseting sambært § 5 í kappingarlógini og hetta hevur Kappingareftirlitið ikki gjørt.

105. Kappingareftirlitið er ósamt í hesum. Kappingareftirlitið hevur gjørt bæði eftirspurnings- og útboðsvaraseting sambært § 5 í kappingarlógini. Skilmarkingin av viðkomandi marknað er at finna í parti 3.2. í hesum skrivi.

106. Advokaturin vísir síðani á møguligu varasetingina millum farbreiðband og breiðband. Kappingareftirlitið hevur bæði í hesum skrivi og longu á fundinum tann 7. november 2019 greitt frá síni støðu til hesa varaseting. Í hesum sambandi verður víst til reglubrot 182 til 184.

107. Advokaturin vísir á, at fleiri hava fartelefoni hald frá arbeiðsgevara og tað eru nógv, sum brúka hesi hald, bæði í arbeiði og til privata nýtslu. Kappingareftirlitið metir at hetta er óviðkomandi fyri skilmarkingina av viðkomandi marknað. Skilmarking snýr seg um hvørjar vørur ella tænastur kunnu koma ístaðin fyri eina ávísa vøru ella ávísa tænastu í eini støðu, har brúkarin skal keypa. Her er nýtslan á fartelefoni haldum, sum arbeiðsgevarin rindar, óviðkomandi.

108. Advokaturin vísir á, at hann longu tann 6. november 2019 hevur biðið um innlit í tær kanningar, sum Kappingareftirlitið hevur gjørt viðvíkjandi viðkomandi marknað. Til hetta er at siga, at advokaturin longu tann 15. november í 2019 fekk skjalayvirlit yvir øll skjøl í málinum[23] og tann 13. oktober 2022 vóru tilmælið og øll skjøl tøk at heinta niður.[24]

---

[23] Skjal: 18/00268-17: Endalig fundarfrásøgn frá 7. nov. 2018 og skjalayvirlit
[24] Skjal: 21/00313-34: Hoyringsskriv og tilmælið um avgerð

#### 2.4.1.2 Lýsing av fjarskiftismarknaðinum

109. Advokaturin vísir á, at hóast Kappingareftirlitið í reglubroti 43 í hesum skjali vísir á, at munurin á avkøstunum hjá feløgunum kann koma av stórrakstri[25], fleriframleiðslu[26], betri innlit í marknaðin, góð kunda sambond, men kann eisini koma av kappingarligum trupulleikum , saknar hann, at Kappingareftirlitið metir um hvørt marknaðarstøðan er sum hon er orsakað av hvussu dugnaligir ávikavist P/f FT samskifti og P/f Nema hava verið.

110. Kappingareftirlitið metir, at hetta hevur ongan týdning fyri ítøkiliga málið, ið snýr seg um hvørt ein ítøkilig framferð, framd tann 25. apríl 2018, var í ósamsvari við § 11 í kappingarlógini. Tað er ikki framferðin hjá FT Samskifti seinastu 10 árini, sum er málsevnið í hesum máli.

111. Advokaturin vísir á, at í tilmælinum til avgerð verður sagt, at aftursvarið hjá P/f FT Samskifti, var ikki grundað á kappingarligar fyrimunir, men á fíggjarligu megina hjá felagnum og tí støðu á marknaðinum, sum felagið hevur arvað frá gamla lógarmonopolinum Telefonverk Føroya Løgtings.

112. Advokaturin metir ikki, at Kappingareftirlitið uttan nærri grundgeving kann siga, at FT Samskifti í 2018 hevði størri fíggjarliga megi enn P/f Nema. Í hesum sambandi vísir advokaturin á, at P/f Nema var dótturfelag hjá íslendska Vodafone Sýn Hf. Advokaturin leggur upp til, at Kappingareftirlitið átti at havt gjørt eina útrokning av fíggjarligu styrkini hjá feløgunum báðum.

113. Kappingareftirlitið er ósamt við advokatinum í hesum. Tað at eitt felag er partur av eini samtøku, merkir ikki, at samtakið vil fíggja hetta felag til eina og hvørja tíð. Vanliga skal eitt vinnuvirksemi geva eitt avkast og harvið kunna fíggja sítt framhaldandi virksemi. Vinnuvirksemi, sum ikki gevur eitt avkast og sum ikki kann væntast at gera tað í framtíðini, verður vanliga niðurlagt.

114. Fíggjarliga styrkin hjá P/f Nema og P/f FT Samskifti skal tí samanberast í mun til smásøluvirksemi hjá feløgunum og ítøkiliga fartelefoni virksemið. Tað er eitt faktum, at P/f Nema bert hevði áleið 14.000 hald, meðan P/f FT Samskifti hevði áleið 42.000 hald og at hetta býti gongur nøkulunda aftur á øllum fjarskiftismarknaðum (sí Talva 2-1) . Tað er eisini eitt faktum, at raksturin hjá P/f Nema er nógv meira treytaður av fartelefoni søluni, enn hjá P/f FT Samskifti (sí Talva 2-4 & Talva 2-2). Somuleiðis framgongur, at avkastið hjá P/f FT Samskifti er væl hægri enn hjá P/f Nema og væl hægri enn altjóða miðal (sí Mynd 2-4: ROIC fyri P/f Samskifti og P/f Nema árini 2013 til 2017). Tað er tí greitt, at P/f FT Samskifti er betur fyri at taka tap ella niðurgongd í inntøkum innan fartelefoni, enn P/f Nema.

115. Orsøkin til, at tann søguliga støðan hjá felagnum hevur serligan týdning er, at samtakið er sprottið úr einum lógarmonopoli. Tað hevur rættuliga stóran týdning fyri kappingarstøðuna í dag, at útgangsstøðið hjá P/f FT Samskifti var ein marknaðarpartur uppá 100% á øllum marknaðum. T.v.s. felagið hevði longu frá byrjan burðadyggan rakstur innan alla smásølu, meðan P/f Nema hevur eitt søguligt útgangsstøði, har marknaðarparturin var 0% innan alla smásølu, og felagið hevur á øllum økjum verið noytt til at vinna sær størri marknaðarpart fyri at fáa rakstur í.

---

[25] Economics of scale
[26] Economics of scope

#### 2.4.1.3 Støðan hjá P/f Nema og P/f FT Samskifti á marknaðinum

116. Advokaturin vísir á, at á føroyska marknaðinum er stórur yvirkapasitetur og vísir á, at gerð av radio access neti og kjarnuneti, krevur munandi íløgur, meðan broytiligu kostnaðirnir eru rættiliga avmarkaðir, tá kervið er gjørt.

117. Advokaturin vísir á endamálsorðingina í § 1 í kappingarlógini sum sigur, at endamálið við kappingarlógini er fulldygg tilfeingisnýtsla, sum sambært lógarviðmerkingum merkir, at tilfeingið verður gagnnýtt til fulnar.

118. Advokaturin metir, at Kappingareftirlitið leggur hindringar í vegin fyri virknari kapping við at seta treytir til P/f FT Samskifti, sum fara út um endamálið við kappingarlógini og sum yvirtíð kann avmarka menningina av nýggjum tænastum á marknaðinum.

119. Advokaturin metir, at tað var í tráð við endamáls orðingina í kappingarlógini, tá partarnir skiftust um at koma við ymiskum átøkum, sum í síðsta enda høvdu við sær, at føroyski brúkarin hevði munandi meir data tøkt enn áðrenn P/f Nema kom við Datarull.

120. Advokaturin endar við at biðja Kappingareftirlitið taka støðu til, um data gávurnar hjá feløgunum uppá langt sigt hava betrað um útboðið av vørum við at framrykkja nýtsluna av data.

121. Í fyrsta lagi skal Kappingareftirlitið vísa á, at tað er onki sum tíður uppá, at gávurnar hava økt um nýtsluna av data.

122. Á strikumyndini niðanfyri sæst nýtslan hjá privat kundum hjá P/f FT Samskifti máld í megabyte í tíðarskeiðinum januar 2017 til mars 2020. Somuleiðis er ein rák-linja, sum er grundað á nýtsluna frá januar 2017 og fram til og við nýtsluna í mars 2018.



123. Sum tað framgongur, so fer nýtslan upp aftaná apríl 2018 og liggur omanfyri rák-linjuna fram til árslok 2018. Síðani hevur nýtslan fylgt rák-linjuni rættililiga væl. Hetta er ein greið ábending um, at gávan hevur ikki havt nakra ávirkan á nýtsluna hjá føroyska brúkaranum.

124. Í øðrum lagi skal Kappingareftirlitið vísa á, at Kappingareftirlitið á eftirlitsvitjan fann greið prógv um, at gávan var eitt aftursvar til Datarull og talan var um eina ætlan um at gera tænastuna óviðkomandi fyri allar brúkar í 8 mánaðir.

125. Vísast skal eisini á, at samfelagslig fulldygg tilfeingisnýtsla skal skiljast sum at vørur og tænastur skulu framleiðast og útbreiðast til lægst møguligan prís, at dygdin skal verða av hægst møguligari dygd, og **at útboðið skal verða í eini nøgd og samanseting, sum hóvar brúkaranum**.[27]

126. Tað er júst hetta, sum er kjarnin í málinum. P/f FT Samskifti roynir við gávuni at ávirka samansetingina av útboðnum hjá kappingarneytanum við at skapa fyribils umstøður, sum høvdu við sær, at ein tænasta, sum var bjóðað út, skuldi í verandi stund verða óviðkomandi hjá brúkaranum.

#### 2.4.1.4 Viðgerð av upplýsingum frá eftirlitsvitjanini á Føroya Tele

127. Advokaturin vísir á, at tað tilfar, sum Kappingareftirlitið tók á eftirlitsvitjan hjá Føroya Tele, stuðlar ikki undir tær niðurstøður, sum Kappingareftirlitið ger í hesum skjali.

128. Advokaturin vísir á, at tað tilfar, sum Kappingareftirlitið tók vísir, at fleiri møguleikar vórðu havdir á lofti, men hetta endaði við, at P/f FT Samskifti valdi at geva egnum kundum 100 GB til at brúka fram til árslok. Innanhýsis samskifti um aftursvarið vísir greitt, at talan var um eitt natúrligt, sakligt og proportionalt aftursvar.

129. Kappingareftirlitið skal í fyrsta lagi vísa á, at tað er ikki rætt, tá advokaturin sigur, at P/f FT Samskifti valdi at geva egnum kundum 100 GB. Í P/f FT Samskifti varð umhugsað at gera júst hetta, men man valdi at geva øllum verandi og nýggjum kundum 100GB.

130. Kappingareftirlitið skal í øðrum lagi vísa á, at tað er rætt, at fleiri loysnir vórðu havdar á lofti í samskiftinum millum [deildarstjóran] og [undirleiðaran], sum møguliga vóru bæði sakligar og proportionalar, men eftir fund í ovastu leiðslu í Føroya Tele samtakinum, varð avgerð tikin um ikki at brúka hesar, men heldur at lata 100Gb til allar verandi og komandi kundar fram til juli 2018 hjá P/f FT Samskifti.

### 2.4.2 Memorandum frá White Label Consulatancy

131. White Label Consultancy (WLC), ið eru ráðgevarar hjá Føroya Tele í hesum máli, hava eisini latið eitt hoyringssvar inn vegna Føroya Tele. Hoyringssvarið er at finna sum fylgiskjal 5.4 til hetta tilmælið.

132. WLC hevur nakrar yvirskipaðar viðmerkingar (Umiddelbare kommentarer til udkastet til afgørelse) í hoyringssvarinum. Kappingareftirlitið hevur ongar viðmerkingar til hesar, tí talan er um rættiliga óneyv uppáhald, sum tó í ávísan mun verða útgreinað betri seinni í hoyringssvarinum. Kappingareftirlitið hevur tó valt at fyrihalda seg til eina atfinning, sum er at finna í yvirskipaðu viðmerkingunum.

[27] Konkurrenceloven med kommentarer af Jacob Pinborg og Kristian Helge Stranton-Andersen, s. 80.

133. WLC heldur uppá, at Kappingareftirlitið roynir at fáa P/f FT Samskifti dømt sekan í sama broti tvær ferðir. WLC sipar til, at Kappingareftirlitið hevur eitt mál koyrandi ímóti P/f FT Samskifti, sum snýr seg um margin squeeze ímóti ávísum felag, samstundis sum Kappingareftirlitið í hesum tilmæli hevur eina meira yvirskipaða ákæru um at loka marknaðin. WLC metir, at talan er reelt um eitt og sama brot.

134. Kappingareftirlitið er ósamt í hesum. Málið sipað verður til, snýr seg um at P/f FT Samskifti í tingingum við ávíst felag um atgongd til farnet, hevur brúkt margin squeeze, tað vil siga, at seta heilsøluprís og smásøluprís soleiðis, at hetta felag ikki kundi koma inn á marknaðin við teimum prísum, sum P/f FT Samskifti bjóðaði. Talan er um ítøkiligar samráðingar millum tveir partar.

135. Í hesum máli er talan um at P/f FT Samskifti hevur valt at geva eina gávu til allar kundar á marknaðinum, har avleiðingin er, at marknaðurin floymdi yvir við data í 8 mánaðir. Kappingareftirlitið metir, at henda gerð hevði við sær, at marknaðirnir vóru reelt læstir í 8 mánaðir fyri triðja parti, og at langtíðar avleiðingin av hesi avgerð er, at atgongdin til marknaðin er versnað, tí aðrir sum møguliga umhugsa at trína inn á marknaðin, noyðast at hava í huga hvat hendi seinast, P/f FT Samskifti kendi seg hótt.

136. Talan er sostatt um tvey ymisk brot og ymiskar partar.

137. Í hoyringssvarinum frá WLC eru fýra ítøkilig viðurskifti, sum víst verður á. Hesi eru: Allýsingin hjá Kappingareftirlitinum av misnýtslu eftir §11, Manglandi kanning av útihýsingarváðanum, gávan er einans vanlig marknaðarmenning, gávan var eitt aftursvar uppá Datarull.

138. Kappingareftirlitið viðger hesi viðurskifti niðanfyri.

#### 2.4.2.1 Allýsing av misnýtslu eftir §11

139. WLC er samt við Kappingareftirlitinum um, at framferðin bert kann verða talan um útihýsandi framferð og ikki útnyttandi framferð. WLC er tó ikki samt við Kappingareftirlitinum í hvussu hugtakið misnýtsla skal fatast og hvussu hugtakið kann allýsast og avmarkast.

140. WLC finnist at Kappingareftirlitinum fyri at vísa til dómar hjá hægstarætti í ES sum t.d. Hoffman-La Roche og Deutche Telekom, tí hesir hava eina alt ov yvirskipaða lýsing av misnýtslu hugtakinum til at man við hesum dómum kann skilja framferð, sum er skaðilig fyri kappingina frá framferð, sum er góð fyri kappingina.

141. Talan eru tó um dómarar, sum javnan víst verður til, tá dómstólar bæði á hægsta instansi í ES og í nationalu dómstólunum, skulu staðfesta, hvørt misnýtsla av ráðandi støðu er farin fram.

142. WLC vísur á, at til hvørt slag av misnýtslu eru komnar sokallaðar "operativar test" , sum ein kappingarmyndugleiki skal brúka fyri at staðfesta um misnýtsla er farin fram.

143. Kappingareftirlitið er ikki heilt samt við WLC í hesum. Í fyrsta lagi er ikki eitt avmarkað tal av misnýtslu sløgum. Tvørturímóti. Í øðrum lagi verða slíkar testir skaptar í sambandi við rættarvenju, og tær eru ikki neyðturviliga skaptar fyri øll vanlig sløg av misnýtslu. Í sambandi við prísmisnýtslu,

er fyri margin squeeze staðfest, at AEC-testin skal brúkast[28], meðan fyri avsláttarskipanir kann hon brúkast sum eitt av mongum amboðum.[29]

144. Brotið sum Kappingareftirlitið hevur staðfest, er ikki eitt prísmisnýtslu brot, talan er um eitt serligt brot, sum ikki kann flokkast undir nakað av teimum brotum, nevnd undir § 11 stk. 1 í kappingarlógini.

145. Tað er ikki óvanligt, at tað eru brot, har ongin einføld operativ test kann ella skal brúkast. T.d. fyri aftur at nevna Baltic Rail-málið[30]. Har var ongin AEC-test gjørt, men bara ein løgfrøðilig meting av støðuni.

146. Kappingareftirlitið er tí ósamt við WLC um, at manglandi operativ test merkir, at Kappingareftirlitið ikki hevur kannað um framferðin er egnað av avmarka kappingina.

#### 2.4.2.2 Manglandi kanning av útihýsingarváðanum

147. WLC vil vera við, at Kappingareftirlitið hevur ikki prógvað, at misnýtslan er egnað til at útihýsa ein líka so effektivan kappingarneyta, vísandi til pkt. 23 í vegleiðingarskrivinum hjá ES kommissiónini um útihýsandi framferð eftir art. 102 í ES sáttmálanum. Her eru tveir grundleggjandi feilir í svarinum hjá WLC. Í fyrsta lagi vísir pkt. 23 til útihýsandi prís framferð, men framferðin í hesum máli er ikki grundað á prís, men á tað faktum, at P/f FT Samskifti gav øllum á marknaðinum 100GB av data fyribils, fyri at Datarull hjá P/f Nema ikki skuldi fáa undirtøku.

148. Talan er í fyrsta lagi um eitt brot, har ein AEC-test er óviðkomandi. Í øðrum lagi hevur Kappingareftirlitið mett um hvørt framferðin hjá P/f FT Samskifti er egnað til at virka útihýsandi í parti 3.4.2.

149. WLC vísir somuleiðis á, at P/f Nema kom við líka stórari gávu, umframt at Kappingareftirlitið hevur staðfest, at gávan førdi ikki við sær, at prísurin kom undir LRAIC. Tí má gruni verða um, at eisini P/f Nema kundi geva gávuna, uttan at hava tap, og var tí ikki í váða fyri útihýsan.

150. Kappingareftirlitið er ósamt í hesi útlegging av málinum. Brotið á § 11, stk. 1 snýr seg um, at gávan frá P/f FT Samskifti varð latin øllum verandi og nýggjum kundum og førdi hetta við sær, at P/f Nema varð tvungið til at koma við egnari gávu ella taka váðan at kundar fóru at flýggja. Avleiðingin av at geva gávuna var fyri P/f Nema, at Datarull gjørdist óviðkomandi fyri allar brúkarar á marknaðinum næstu átta mánaðirnar.

151. WLC vísir somuleiðis á, at talið av porteringum var støðugt árini 2017 til 2019, og metir hetta prógvar, at datagávan fastlæsti ikki marknaðin.

152. Kappingareftirlitið metir ikki, at hesi hagtøl vísa hetta. Í fyrsta lagi framgongur ikki nær porteringarnar eru farnar fram. Í øðrum lagi eru bæði vinnuhald og privathald blandað saman í hagtølunum. Her er ein serliga stór óvissa, tí tá vinnufyritøkur skifta veitarar, er talan ofta um rættiliga nógvar porteringar. Kappingareftirlitið metir, at vinnuhald fevna um ein lutfallsliga stóran part av hagtølunum. Í triðja lagi førdi gávan hjá FT Samskifti til, at P/f Nema varð tvungið til at geva egna gávu, soleiðis at marknaðurin floymdi yvir av data. Tað vil siga, at data gjørdist eitt

---

28 Telesonera

29 Post Danmark II

30 C-42/21: Lietuvos geležinkeliai AB v European Commission.

óviðkomandi parametur hjá kundanum, sum kundi fáa nokk av hesum allastaðni. Tí er tað ikki løgið, um marknaðurin var sum altíð, tað var júst hetta, sum Kappingareftirlitið metir, at P/f FT Samskifti alla tíðina hevði í umbúna, nevniliga ein marknað, har kundarnir ikki spardu data upp.

#### 2.4.2.3 Gávan er einans vanlig marknaðarmenning

153. WLC vísir á, at gávan einans var ein framsókn av eini markanaðarútvikling, sum vildi verið veruleiki fyrr ella seinni. WLC vísir so til eitt brot úr præmis 62 í tilmælinum hjá General Advokat Rantos í máliå C-377/20 – Servizio Elettricio.

154. Kappingareftirlitið heldur, at reglubrot 62 skal endurgevast í síni heild her:

> "In the third place, and without claiming to be exhaustive, I note that conduct that does not come within the concept of 'competition on the merits' is generally characterised by the fact that it is not based on obvious economic reasons or objective reasons. Examples of competition on the merits, therefore, would include conduct which reduces the costs of the dominant undertaking by increasing efficiency in some way and which has the effect of broadening consumer choice by putting new goods on the market or by increasing the quantity or quality of the goods already on offer. By contrast, if there is no justification for the conduct other than to harm competitors, that conduct will necessarily not come within the scope of competition on the merits."

155. P/f FT Samskifti hevur nettupp ikki givið gávuna fyri at lækka um sínar kostnaðir, víðkað um úrvalið hjá brúkarum, ella økt um mongd ella kvalitet á tænastum, sum longu eru til sølu. P/f FT Samskifti hevur latið eina tíðaravmarkaða gávu, heldur enn at koma við nýggjum tænastum á marknaðin, og hevur gjørt hetta fyri at tryggja, at ávís tænasta ikki fekk undirtøku á marknaðinum.

#### 2.4.2.4 Gávan var eitt aftursvar uppá Datarull

156. WLC vísir á, at tað er ein grundsetningur innan kappingarrætt, at ráðandi fyritøkan hevur rætt til at svara aftur uppá søluátøk hjá kappingarneytum.

157. Kappingareftirlitið er samt í hesum, men sum víst verður á aðrastaðni í hesum tilmæli, er hesin rættur hvørki treytaleysur ella óavmarkaður.

158. WLC vísir á, at tá P/f Nema kom við Datarull, broyttust umstøðurnar á marknaðinum grundleggjandi, tí nú kundi kundin velja hald eftir miðal ársnýtsluni og ikki miðal mánaðarligu nýtsluni. Hetta hevði við sær, at haldini hjá P/f FT Samskifti frá degi til dags koma at verða minni áhugaverd og meira avmarkað enn tey hjá P/f Nema, og tí noyddist P/f FT Samskifti at koma við onkrum.

159. WLC vísir á, at valda loysnin viðførdi ikki tap fyri P/f Nema, økti ikki kostnaðin hjá P/f Nema, avmarkaði ikki inntøkumøguleikarnar hjá P/f Nema og tað var ein loysn, sum P/f Nema lætt kundi kopiera.

160. Kappingareftirlitið vil vísa á, at í fyrsta lagi er tað í øllum førum ikki rætt, at valda loysnin ikki viðførdi tap fyri P/f Nema, sum eftir egnum málistokki hevði brúkt munandi upphædd til at menna og marknaðarføra eina loysn, sum tá alt kom til alt, ikki fekk undirtøku á marknaðinum, orsakað av framferðini hjá P/f FT Samskifti.

161. Í øðum lagi tekur grundgevingin ikki hædd fyri at brúkarin misti vælferð, tí P/f FT Samskifti tók avgerð um, at ávís tænasta skuldi ikki vera á marknaðinum. Hetta eigur brúkarin sjálvur at avgera.

### 2.4.3 Framløga á fundi í Kappingarráðnum

162. Sambært §10 í starvs- og fundarskipan fyri Kappingarráðið kann tann sum ein avgerð hjá Kappingarráðnum viðvíkur hava eitt stutt munnligt innlegg fyri ráðnum, áðrenn ráðið tekur avgerð í málinum. Innleggið skal einans viðvíkja eini eyka útdýping ella uppkláring av teimum veruligu og rættarligu umstøðunum í málinum.

163. Umboð fyri Føroya Tele høvdu eina stutta framløgu fyri ráðnum har víst var á, at 100GB gávur vóru heilt vanligar í øðrum londum. Víst var á at síðani 3G kom á marknaðin hava øktir datapakkar verið ein fastur táttur í marknaðarførðingini innan fartelefoni.

164. Umboð fyri Føroya Tele vísti á átak hjá Deutche Telekom har felagið lovaði øllum kundum 100GB ókeypis í sambandi við jólini 2022, átak hjá WOM í Chile har kundar hjá felagnum kundu fáa upp til 100GB ókeypis at brúka í 10 mánaðir, og átak hjá Vodafone Týskland har kundar kundu fáa 100GB ókeypis at brúka í ein mánað.

165. Kappingarráðið metti ikki at tey átøk sum víst var á vóru sambærlig. Øll høvdu eitt handilsligt endamál, flestu veitararnir vóru ikki størstir á marknaðinum, gildistíðin var ofta rættuliga avmarkað, og kundarnir vóru ofta sáttmálabundnir.

166. Umboð fyri Føroya Tele vísti eisini á átøk frá BT og Telia, har talan ikki var um gávur, men um tíðaravmarkað tilboð uppá hald við flat rate data.

167. Kappingarráðið metti ikki at hesi átøk vóru sambærlig við gávuna í hesum málið. Talan var um átøk sum høvdu eitt rættuliga greitt handilsligt endamál.

168. Umboð fyri Føroya Tele søgdu at tað var skeivt tá Kappingareftirlitið í pkt. 149-150 í sínum tilmælið segði at AEC-testin bara er viðkomandi fyri mál um prísmisnýtslu. Víst var partvís á brot hjá AG Rantos í máli C-377/20 Servizio Elettrico og dóm í C-680/20 – Unilever. Somuleiðis var víst at reglubrot 81 í tilmælinum frá AG Rantos í C-377/20, har sagt verður at ein útihýsandi framferð sum er økonomiskt rentabel og sum kappingarneytar kunna eftirlíkna kann ikki verða í til skaða fyri kappingina.

169. Kappingarráðið vil vísa á, at endurgivnu reglubrotini í tilmælinum siga ikki at AEC einans kann brúkast í sambandi við prísmisnýtslu. Tað stendur at pkt. 23 í vegleiðingini hjá ES kommissiónini sipar til prísmisnýtslu, at framferðin í hesum málið kemur ikki undir prísmisnýtslu, og at Kappingareftirlitið ikki metir at ein AEC-test er viðkomandi í hesum ítøkiliga málið.

170. Viðvíkjandi tilmælinum frá AG Rantos, so er ikki talan um dóm, men um eitt tilmælið til dómstólin og reglubrot 81 hjá AG Rantos verður ikki endurgivið í sjálvum dóminum. Tað verður fleiri ferðir víst til reglubrot í tilmælinum hjá AG Rantos, bara ikki til reglubrot 81. Uttan mun til hetta metir Kappingarráðið at reglubrotið er óviðkomandi fyri hetta mál.

# 3 Meting

## 3.1 Grein 11 í kappingarlógini

171. Eftir § 1, stk. 1 1 í føroysku kappingarlógini er misnýtsla av eini ráðandi marknaðarstøðu ólóglig.

172. Tað áleggur Kappingareftirlitinum at prógva, at ein ráðandi marknaðarstøðu fyriliggur og at ráðandi fyritøkan hevur misnýtt sína støðu á marknaðinum. Ráðandi fyritøkan kann hinvegin prógva, at umstrídda framferðin er grundað á saklig viðurskifti. Megnar fyritøkan at lyfta hesa próvbyrðu, er onki brot framt á § 11 í kappingarlógini.

173. Eitt av endamálunum við kappingarlógini var at laga føroyska kappingarlóggávu til kappingarlóggávuna í ES samveldinum. Í parti C í almennu viðmerkingunum til kappingarlógina framgongur, at § 11 í kappingarlógini svarar til grein 102 í ES sáttmálanum.

174. Evropeisk dómssiðvenja eftir grein 102 í ES sáttmálanum er tí viðkomandi tulkingarískoyti í málum eftir § 11 í kappingarlógini.

## 3.2 Viðkomandi marknaður

175. Í §5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skal kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði. Hetta er fyri at staðfesta í hvønn mun fyritøkan er undir kappingarligum trýsti. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varasetingin í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping skal kannast um tað er neyðugt. Somuleiðis skal ásetingin skiljast soleiðis, at varaseting skal kannast undir øllum umstøðum, men at aðrir hættir eisini kunnu brúkast.

176. Í sambandi við skilmarkingina av viðkomandi marknaði, skal bæði viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður staðfestast. Hetta merkir, at kanningin skal staðfesta um tað eru aðrar vørur á marknaðinum, sum kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum partarnir veita. Eisini skal landafrøðiliga støddin á marknaðinum staðfestast. Landafrøðiligi marknaðurin er tað øki, har partarnir umseta ella avtaka vørur og har kappingarligu umstøðurnar eru so líkar, og sum líkjast frá teimum, sum eru galdandi í grannaøkjum.

### 3.2.1 Viðkomandi vørumarknaður

177. Klagað varð um, at P/f FT Samskifti tann 25. apríl 2018 gav øllum Ver kundum 100GB av data ókeypis, ið kundi brúkast fram til ársenda. Brúkararnir, sum fingu sær eitt VER-hald áðrenn 31. juli 2018, fingu somu sømdir.

178. Ver-hald er ein avsláttarskipan, har familjan kann savna síni hald og fáa ein avsláttur. Prísurin á Ver-haldinum er treytaður av hvussu nógvir brúkarar eru og hvussu stór nøgd av data er vald til haldið. Allir brúkarar í einum Ver-haldið hava somu nøgd av data, umframt óavmarkaða talu og óavmarkað tal av SMS.

179. Hey-hald, sum eru haldini hjá P/f Nema, hava somu eyðkenni sum VER-hald. Einasti munur millum Ver og Hey eru hvørjar nøgdir av data kunnu veljast.

180. Kappingareftirlitið metir, at VER- og Hey hald kunnu varasetast, tí hesar tænastur hava somu eyðkenni. Um lutfalsliga prísstøðið á VER-haldum hækkaði við 10% í mun til Hey-haldini, er sannlíkt, at brúkarar flyta yvir til P/f Nema.

181. Í 2018 vóru bert VER-hald og Hey-hald til sølu til privatar brúkarar á føroyska marknaðinum. Tá vóru onnur eldri sløg av haldi framvegis virkin, men hesi sløg av haldum kundu ikki keypast í 2018.

182. Føroya Tele hevur víst á, at ávís varaseting fer fram millum fast breiðband og farbreiðband og millum dedikerað farbreiðband og farbreiðband.[31]

183. Kappingareftirlitið hevur ta støðu, at fast breiðband og dedikerað farbreiðband kunnu ikki varasetast fyri farbreiðband orsakað av manglandi flytføri. Hinvegin kann farbreiðband varasetast fyri bæði fast breiðband og dedikerað breiðband. Sostatt er varasetingin millum farbreiðband og ávikavist fast breiðband og dedikerað breiðband einvegis varaseting. Sambandi millum farbreiðband og ávikavist fast breiðband og dedikerað breiðband er tí, at seinnu tænasturnar í ávísan mun kunnu fullgera fyrru[32], meðan fyrra kann varasetast fyri tær seinnu.

184. Ein einføld test fyri at staðfesta um varaseting er til staðar er, at hugsa hvat vildi hent um prísurin á VER-haldum hækkaði við 10%. Vildi príshækkanin ført til øktan eftirspurning eftir føstum breiðbandshaldum? Kappingareftirlitið metir at svarið er nei, millum annað orsakað av vantandi flytføri.

185. Sambært viðmerkingunum til § 5 í kappingarlógini er álagt Kappingareftirlitinum at kanna varaseting av útboði í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði. Í hesum sambandi skal Kappingareftirlitið meta um hvørt veitarar á øðrum marknaðum, innan stutt skotbrá, avmarkaðan kostnað og váða, kunnu broyta sítt útboð til tænastur, sum kunnu varasetast fyri VER-hald, um prísurin á VER-haldum hækkaði við eini lutfalsligari lítlari upphædd.

186. Eitt felag, sum ynskir at trína inn á føroyska fartelefoni marknaðin, noyðist at fáa avtalur í lag við bæði P/f Nema og P/f FT Samskifti um samband til teirra farnet. Somuleiðis skal eitt felag hava avtalur við P/f Net ella annan veitara um uttanlandssamband.

187. Eitt felag, sum kemur inn á fartelefoni marknaðin, kemur at gera váðamiklar íløgur. Velur felagið eina full-scale loysn, t.v.s. at gera egið farnet, verður talan um sera stóra og váðamikla íløgu, serliga tí at marknaðurin er so lítil.

188. Um felagið velur at gerast MVNO-veitari, lækkar íløgukravið og harvið eisini íløguváðin, men bundinskapurin til antin P/f FT Samskifti ella P/f Nema gerst størri, her liggur sostatt eisini ein annar váði.

189. Kappingareftirlitið metir ikki, at tað vóru aðrir veitarar á øðrum marknaðum, sum uttan stórvegis íløgu og váða kundu koma inn á marknaðin í 2018. Seinasta dømi har fyritøka royndi at koma inn á marknaðin var Sp/f Tosa. Felagið byrjaði tingingar um at gerast MVNO í 2017 og kom á marknaðin miðskeiðis í 2020. Kappingareftirlitið metir somuleiðis, at tað bar ikki til at koma inn á marknaðin uppá stutt skotbrá meðan gávan var í gildi.

---

[31] Skjal: 18/00268-13 Viðmerkingar frá FT Samskifti til fráboðanina um kappingarlig ivamál tann 18. okt. 2019
[32] Complementary goods

190. Kappingareftirlitið metir tí, at viðkomandi vørumarknaður er marknaðurin fyri fartelefoni hald bunta við talu, sms og data. Hetta var ein skilmarking, sum Kappingareftirlitið og umboð fyri Føroya Tele komu ásamt um á fundinum tann 7. november 2019.[33]

### 3.2.2 Viðkomandi landafrøðiligi marknaður

191. Tá viðkomandi landafrøðiligi marknaður skal skilmarkast, er viðkomandi at hyggja eftir hvat eyðkennir marknaðin.

192. Tænastan er eitt fartelefoni hald buntað við talu, sms og data. Um eitt VER-hald verður brúkt í útlandinum, noyðist brúkarin at rinda eitt eyka gjald fyri reiking á útlendska farnetinum. VER-brúkarar kunnu velja at rinda eitt eyka gjald fyri VerSumHeima og á tann hátt fáa ein bíligari reiking prís.

193. Útlendingar sum ferðast í Føroyum og brúka fartelefon við útlendskum haldi. Hesir koma at rinda ein føroyskan reikingar kostnað til antin P/f FT Samskifti ella P/f Nema.

194. Grundað á hesi eyðkenni við fartelefoni marknaðum, er vanligt, at fartelefoni marknaðir í kappingarmálum eru avmarkaðir til lond.

195. Kappingareftirlitið metir, at viðkomandi landafrøðiligi marknaður í hesum føri eru Føroyar.

196. Føroya Tele hevur í sínum viðmerkingum til Kappingareftirlitið viðmerkt, at man var samdur við skilmarkingina hjá Kappingareftirlitinum av viðkomandi landafrøðiliga marknað.[34]

### 3.2.3 Ávegis niðurstøða um viðkomandi marknaðir

197. Kappingareftirlitið metir viðkomandi marknað at verða fartelefoni hald buntað við talu, sms og data í Føroyum.

198. Hvørki fast breiðband ella dedikerað breiðband kunna varasetast fyri farbreiðband orsakað av vantandi mobiliteti.

199. Reiking hjá brúkarum er ein eyka tænasta, sum brúkarin rindar serstakt fyri og har nýtslan fer fram uttanfyri landoddar.

200. Hetta merkir, at veitarar av fartelefoni á útlendskum marknaðum, og brúkarar við útlendskum haldum, ið reika í Føroyum, eru ikki partar av viðkomandi landafrøðiliga marknað.

## 3.3 Ráðandi støða

201. Talan er um eina ráðandi marknaðarstøðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða fyri munagóðari kapping á viðkomandi marknaði, tí nevnda støða gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkaranum.[35]

202. Óheft í hesum sambandi er í hvønn mun ræðið hjá ávísu fyritøkuni verður avmarkað av kappingini. Fyri at ein ráðandi støða kann verða til staðar er neyðugt, at ræðið hjá ávísu fyritøkuni ikki í nóg

---

[33] Skjal: 18/00268-17: Endalig fundarfrásøgn frá 7. nov. 2018 og skjalayvirlit
[34] Skjal: 18/00268-13 Viðmerkingar frá FT Samskifti til fráboðanina um kappingarlig ivamál tann 18. okt. 2019
[35] United Brands, reglubrot 65

stóran mun verður avmarkað av kappingini við teirri avleiðing, at ávísa fyritøkan kann taka avgerðir, uttan at taka atlit til kappingarneytar, kundar og endaliga brúkaran[36].

203. Hugtakið ráðandi støða, skal altíð gerast ítøkilig í mun til ein viðkomandi marknað.[37] Við støði í skilmarkingini av viðkomandi marknað eftir § 5 í kappingarlógini, skal metast um, hvørt ein ella fleiri fyritøkur hava eina ráðandi støðu á viðkomandi marknaði.

204. Tað at ein fyritøka hevur eina ráðandi marknaðarstøðu merkir ikki, at hon hevur framt brot á § 11 í kappingarlógini. Tað er misnýtslan av eini ráðandi støðu, sum er ólóglig sambært § 11 í kappingarlógini.

205. Men ráðandi fyritøkan hevur eina serliga skyldu til at tryggja, at hon við sínum atburði ikki skaðar kappingina[38].

206. ES kommissiónin hevur latið gjørt eina vegleiðing um útihýsandi framferð hjá ráðandi fyritøkum.[39] Í hesi vegleiðing verður m.a. greitt frá hvat metingarstøði ES Kommissiónin brúkar í sambandi við ræðið.

207. ES Kommissiónin leggur serliga vekt á trý viðurskifti, tá ið metast skal um ávís fyritøka hevur marknaðarræði. Í fyrsta lagi í hvønn mun verandi útboð frá kappingarneytum og teirra støða á marknaðinum avmarkar ávísu fyritøkuna. Í øðrum lagi í hvønn mun hóttan um økt útboð frá verandi kappingarneytum og hóttan um innrás av nýggjum kappingarneytum avmarkar ávísu fyritøkuna. Í triðja lagi í hvønn mun ávísa fyritøkan verður avmarkað av tingingarmegi hjá keyparum.[40]

208. Kappingareftirlitið hevur í hesum máli styðjað seg til metingarstøðið hjá ES Kommissiónini. Í parti 3.3.1. verður hugt eftir í hvønn mun útboðið frá P/f Nema og teirra støða á marknaðinum fram til og við 2018 kundi sigast at hava avmarkað P/f FT Samskifti. Í parti 3.3.2. verður hugt eftir í hvønn mun hóttan um økt útboð frá P/f Nema og hóttan um innrás av nýggjum kappingarneytum kann sigast at hava avmarkað P/f FT Samskifti. Í parti 3.3.3. verður hugt eftir um tað vóru kundar við tingingarmegi á viðkomandi marknað, sum kundu avmarka P/f FT Samskifti.

### 3.3.1 Marknaðarstøðan hjá ráðandi fyritøkuni og hjá kappingarneytum

209. Marknaðarpartar eru ein týðandi ábending um ávís fyritøka hevur eina ráðandi støðu. Sambært vegleiðingarskrivinum frá ES Kommissiónini er marknaðarpartur niðanfyri 40% ein ábending um at ávísa fyritøkan ikki hevur eina ráðandi støðu.[41]

210. Tað kunnu verða serlig viðurskifti, sum gera, at ein fyritøka, sum hevur ein marknaðarpart niðanfyri 40%, framvegis hevur eina ráðandi støðu. Dømi um slík serlig viðurskifti er um kappingarneytar hava ein avmarkaðan framleiðslumátt og teir tí ikki kunna væntast at økja um sítt útboð.

---

36 OJ C45, 24.2.2009, síða 8
37 Viðmerkingar til § 11, stk. 2 í løgtingsmál nr. 110/2006: Uppskot til løgtingslóg
38 Michelin, reglubrot 57
39 OJ C 45, 24.2.2009, síða 8
40 OJ C45, 24.2.2009, síða 12
41 Vegleiðingarskriv hjá ES kommissiónini pkt. 14

211. Sambært serligu viðmerkingunum til § 11 í kappingarlógini, er ein marknaðarpartur omanfyri 50% í sær sjálvum ein ábending um eina ráðandi støðu[42]. Tó eigur ein kappingarmyndugleiki altíð at gera eina fullfíggjaða kanning av ráðandi støðu, tí tað kunnu verða viðurskifti, sum undantaksvís gera, at ongin ráðandi støða fyriliggur[43,44].

212. Tess størri marknaðarparturin er, tess sterkari er ábendingin um eina ráðandi støða. T.v.s. ein marknaðarpartur á 80% gevur eina sterkari ábending um eina ráðandi støðu, enn marknaðarparturin á 55%[45].

213. Somuleiðis er galdandi, at ein marknaðarpartur, sum hevur verið á 50% yvir fleiri ár, t.d. 5 ár, er ein sterkari ábending um eina ráðandi støðu enn, um ein marknaðarpartur á 50% sum bert hevur verið í 2 ár[46].

214. Á talvuni niðanfyri eru marknaðarpartar hjá P/f FT Samskifti og P/f Nema, vøkstur í tal av haldum og vøkstur í tal av haldum hjá hvørjum felag í tíðarskeiðinum 2015 til 2018.

*Talva 3-1: Marknaðarpartar, marknaðar- og fyritøkuvøkstur árini 2015til 2018*

| Fartelefoni hald | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Marknaðar broyting | Vøkstur býtt á felag |
|---|---|---|---|---|---|---|
| P/f FT Samskifti | 72 | 73 | 74 | 75 | 6,3 | 8,5 |
| P/f Nema | 28 | 27 | 26 | 25 | | -2,2 |

Kelda: Hagtøl Fjarskifti, Fjarskiftiseftirlitið, tikið av https://www.fjarskiftiseftirlitid.fo/fo/kunning/hagtoel

215. Marknaðarparturin hjá P/f FT Samskifti hevur í øllum tíðarskeiðinum verið omanfyri 70% og er hækkaður í tíðarskeiðinum. Sambært næst uttasta rað til høgru, er marknaðurin fyri privat fartelefoni hald vaksin við 6,3% í tíðarskeiðinum. Hóast marknaðurin er vaksin, er P/f Nema gingið aftur.

216. Talvan omanfyri staðfesti tvey týðandi viðurskifti í mun til spurningum um í hvønn mun P/f Nema avmarkar marknaðarvaldið hjá P/f FT Samskifti. Fyrsta staðfestingin er, at marknaðarparturin var væl omanfyri 50% í 2018 og at marknaðarparturin hevði verið omanfyri 50% í longri tíð.[47]

217. Afturat skal viðmerkjast, at hóast marknaðurin er vaksin við 6,3%, so hevur P/f FT Samskifti tikið allan vøkstur í sín part, umframt at hava tikið frá P/f Nema.

218. Ein kappingarneyti, sum ikki megnar at taka part av einum øktum vøkstri og enntá hevur ein negativan vøkstur, leggur ikki serliga nógv kappingarligt trýst á P/f FT Samskifti.

[42] Løgtingsmál nr. 110/2006, viðmerkingar til § 11
[43] C-62/86 AKZO Chemie BV, reglubrot 60-61
[44] C-85/86 Hoffmann-La Roche, reglubrot 39-41
[45] O.J. C 45, 24.2.2009, síða 9
[46] O.J. C 45, 24.2.2009, síða 9
[47] Sí eisini reglubrot 212 og 213

219. Tað framgongur eisini av innanhýsis skjølum[48,49] hjá Føroya Tele, at man metir seg hava fult tamarhald á kappingini.

220. Kappingareftirlitið metir, at tað er viðkomandi at hyggja at marknaðarstøðuni á øðrum fjarskiftismarknaðum eisini. Tað er ein royndur lutur, at ein ráðandi fyritøka kann brúka sína positión á einum marknað til at fíggja eina kappingaravlaging á einum øðrum marknað.

221. Í talvuni niðanfyri síggjast marknaðarpartarnir hjá Føroya Tele samtakinum innan fastnet telefoni til privat og vinnu, fartelefoni til vinnu, fast breiðband og fleirrás sjónvarp. Hesir marknaðir eru ikki skilmarkaðir eftir § 5 í kappingarlógini, men sambært serlóggávuni innan farskifti. Aftur sæst í hvønn mun marknaðurin hevur verið í vøkstri ella minking.

*Talva 3-2: Marknaðarpartar innan telefoni, fartelefoni til vinnukundar, fast breiðband og fleirrás sjónvarp árini 2015-18*

| Aðrir fjarskiftismarknaðir | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | Marknaðar broyting |
|---|---|---|---|---|---|
| Fastnet telefoni til privatkundar | 85% | 82% | 83% | 83% | -19,5% |
| Fastnet telefoni til vinnukundar | 79% | 80% | 76% | 80% | -5,6% |
| Fartelefoni til vinnukundar | 77% | 77% | 78% | 77% | 8,1% |
| Fast breiðband | 76% | 77% | 77% | 78% | 2,2% |
| Fleirrás sjónvarp | 78% | 79% | 73% | 71% | 8,6% |

Kelda: Hagtøl Fjarskifti, Fjarskiftiseftirlitið, tikið av https://www.fjarskiftiseftirlitid.fo/fo/kunning/hagtoel

222. Sum tað framgongur av talvuni omanfyri, so hevur Føroya Tele havt ein marknaðarpart sum er væl omanfyri 50% á øllum marknaðum síðani 2015. Í viðmerkingunum til § 11 í kappingarlógini stendur, at ein marknaðarpartur omanfyri 50% í sær sjálvum er ein klár ábending um eina ráðandi støðu.[50]

223. Somuleiðis skal viðmerkjast, at marknaðarpartarnir eru væl omanfyri 50% og hava verið væl omanfyri í øllum tíðarskeiðinum 2015 til 2018.[51]

224. Sum sæst av rað seks í talvuni, so er ymiskt hvussu gongdin hevur á teimum einstøku marknaðunum. Á nøkrum marknaðum er talið av haldum hækkað og á øðrum marknaðum er talið av haldum lækkað. Men Føroya Tele hevur yvirhøvur megnað at hildið fast um sína støðu á marknaðinum.

225. Føroya Tele styrkti um sína støðu á fjarskiftismarknaðum, sum eisini í framtíðini fara at verða týðandi økir hjá fjarskiftisvinuni, meðan felag er gingið aftur innan fastnet, sum áður nevnt er ein tøkni, sum er við at ganga út ella sum í øllum førum ikki verður til tann breiðan skaran í framtíðini.

48 KE-DE0011: /LogicalFileSet2/[...]/User drev/[...]/Diverse/nevndarfundur 21,04,2017/Framløga FT nevnd [...].pptx
49 KE-DE005: /img_DE005.001/Users/[...]/OneDrive - ft.fo/Føroya Tele Nevnd/Board meetings 2018/Board meeting November 21, 2018/Risk Assessment 2018.pdf
50 Løgtingsmál nr. 110/2006, viðmerkingar til § 11
51 sí eisini reglubrot 212 og 213

226. Kappingareftirlitið metir, at P/f FT Samskifti og Føroya Tele samtakið sum heild vóru ikki avmarkað av verandi útboði og kappingarneyta í 2018. P/f FT Samskifti hevði ein marknaðarpart á viðkomandi marknað, sum er væl omanfyri tað, sum sambært viðmerkingunum til § 11 í kappingarlógini verður mett at vera eitt prógv um ráðandi støðu. Marknaðarparturin hjá P/f FT Samskifti øktist í tíðarskeiðinum frá 2015 til og við 2018. Í eini støðu við einum øktum eftirspurningi, hevur FT Samskifti megnað at taka allan vøksturin, umframt at taka kundar frá sínum kappingarneyta. Støðan á øðrum fjarskiftismarknaðum var meinlík henni á viðkomandi marknað.

### 3.3.2 Hóttan um víðkan av útboði og innrás á marknaðin

227. Ein fyritøka sum at síggja til hevur eina ráðandi støðu, t.d. við at hava eina sterka marknaðarstøðu, kann framvegis ikki hava møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, tí ein hóttan er um at verandi kappingarneytar kunna víðka sína framleiðslu ella møguligir nýggir kappingarneytar kunna gera innrás á marknaðin.

228. Slík hóttan er einans eftirfarandi um verandi ella møguligir nýggir kappingarneytar innan stutt skotbrá og uttan stórvegis av íløgum kunna økja sítt útboð á marknaðinum.

229. Í 2018 var bert ein kappingarneyti á viðkomandi marknað, P/f Nema. P/f Nema hevði og hevur egið farnet og hevur fingið útlutað fleiri frekvensir enn vóru í nýtslu í 2018. P/f Nema hevði tí eyka kapasitet í 2018. Hóast hetta, so var marknaðarstøðan hjá P/f Nema viknað nógv á viðkomandi marknað árini fram til og við 2018. Í 2015 hevði P/f Nema ein marknaðarpart á 28% og í 2018 var marknaðarparturin fallin til 25%. Afturgongdin hendi í einum tíðarskeiði, har talið av haldum á marknaðinum hækkaði við 6%. Í hesum tíðarskeiði misti P/f Nema áleið 2% av sínum haldum[52].

230. Kappingareftirlitið hevur eisini í sambandi við eftirlitsvitjan hjá Føroya Tele funnið prógv, sum vísa hvat leiðslan helt um hóttanina frá verandi kappingarneyta.

231. Í eini framløgu, sum Kappingareftirlitið metir verða lagda fram á einum nevndarfundi í móðurfelagnum, P/f Telefonverkið, tann 21. apríl 2017, eru fylgjandi notur til framløguna.[53]

> "Market share is more or less unchanged since 2007…when [persónur í ovastu leiðslu] started at Vodafone☺. The share is around 70/30 and we feel that we have total control over the competition. We have in fact gain around 800 mobile subscribers since number portability was launched…"

232. Útsøgnin omanfyri snýr seg um kappingarstøðuna millum Føroya Tele samtakið og P/f Nema, og prógvar greitt, at leiðslan í Føroya Tele kennir seg ikki hóttan av verandi kappingarneyta.

233. Hóttanin um, at nýggir kappingarneytar kunna trína inn á marknaðin, kann avmarka atburðin hjá Føroya Tele. Hóttanin um innrás á marknaðinum kann hava við sær, at Føroya Tele ikki kann hava ein óheftan atburð á marknaðinum.

---

52 sí talvu 3-1

53 KE-DE0011: /LogicalFileSet2/[...]/User drev/[...]/Diverse/nevndarfundur 21,04,2017/Framløga FT [...].pptx

234. Fyritøkur kunna koma inn á viðkomandi marknað, antin við at byggja egið farnet ella sum MVNO. Ein MVNO keypir atgongd til ferðslu í heilsølu frá verandi veitarum fyri síðani at selja fartelefoni tænastur í smásølu.

235. Ein hóttan um at ein fyritøka fer at byggja egið farnet, vildi ikki verið eftirfarandi, tí tað eru longu tvey farnet í Føroyum. Støddin á íløguni í mun til støddina á marknaðinum ger at hetta vildi ikki loyst seg. Serliga í dag, nú íløgutørvurin í sambandi við 5G er somikið stórur, at dagarnir við tveimum farnetum helst eru taldir [54].

236. Ein hóttan um at fyritøka kemur inn sum MVNO'ari er størri, tí íløgukravið er meira avmarkað. Kostnaðir hjá fyritøku, sum kemur inn á henda hátt, eru øðrvísi enn hjá einum vanligum fjarskiftisveitara, tí fasti kostnaðurin er lutfalsliga lítil, meðan broytiligi kostnaðurin er lutfalsliga stórur.

237. Ein fyritøka, Sp/f Tosa, royndi at koma inn á marknaðin longu í 2016, tá umboð fyri fyritøkuna byrjaðu at samráðast við Føroya Tele. Ætlanin var at trína inn á marknaðin í 2017. Sp/f Tosa megnaði ikki at fáa avtalu í lag við Føroya Tele, men megnaði at koma inn á marknaðin í 2020, eftir at hava fingið avtalu í lag við P/f Nema.

238. Frá skjølum, sum vórðu fingin inn í sambandi við eftirlitsvitjan á Føroya Tele framgongur, at leiðslan var órógvað av, at fyritøkur sannlíkt fóru at royna MVNO-leistin [55,56,57].

239. Føroya Tele valdi eisini at leita sær strategiska ráðgeving í 2017 frá ráðgeva innan fjarskifti um hóttanina frá einum møguligum MVNO-veitara og hvussu eftirlitsmyndugleikin, Fjarskiftiseftirlitið, skuldi handfarast í hesum sambandi [58,59].

### 3.3.3 Tingingarmegi hjá kundum

240. Ein fyritøka, sum at síggja til hevur eina ráðandi støðu á einum marknað, kann framvegis verða avskorin frá óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, veitarum og brúkarum, um allir ella ávísir kundar hava tingingarmegi.

241. Ein kundi hevur tingingarmegi um hesin av einari ella aðrari orsøk hevur serligan týdning fyri seljaran og um keyparin lættliga kann skifta veitara, hjálpa til at nýggjur veitari kemur inn á marknaðin, ella kann byrja egna framleiðslu. Mest vanliga orsøk til tingarmegi er, at keyparin keypir stóran part av útboðnum hjá seljaranum.

242. Við árslok 2018 vóru 56.792 fartelefoni hald í Føroyum og 40.689 av hesum vóru á viðkomandi marknað. Sølan máld í GB var 2,9 mia. GB og størsta einstaka haldið, sum kundi fáast, var eitt hald við 6 brúkarum, sum hvør sær høvdu 26GB.

---

[54] https://kvf.fo/greinar/2019/05/01/hey-calls-shared-5g-network
[55] KE-DE0012: brúkari: [...]: T-postur frá [...]: "Fwd: Facebook kampagna frá MVNO"
[56] KE-DE0011: Brúkari: [...].: Framløga: "/LogicalFileSet2/[...]/User drev/[...]/Diverse/Framløgur/Board Meeting August 30, 2018 (Vision 2025).pptx"
[57] KE-DE005: Brúkari: [...]:Framløga: /img_DE005.001/Users/[...]/Desktop/10.12.2020/Upprit um Tosa.pptx
[58] KE-DE0012: Brúkari: [...]: T-postur: "Notat: Regulatorisk handlingsplan", \\Top of Personal Folders\[...] (Primary)\Top of Information Store\Inbox\01. Fíggjarøkið\01. Fíggjardeildin
[59] KE-DE0012: Brúkari [...]: T-postur: "Strategiske tanker omkring forhandlingerne med Vodafone og den kommende MVNO.": \\Top of Personal Folders\[...] (Primary)\Top of Information Store\Inbox\01. Fíggjarøkið\01. Fíggjardeildin

243. Eyðkenni við viðkomandi marknað í 2018 var, at tað vóru tveir veitarar og nógvir kundar. Grundað á hesi eyðkenni kann staðfestast, at á viðkomandi marknað var ongin kundi, sum við síni tingarmegi kundi avmarkað P/f FT Samskifti.

### 3.3.4 Ávegis niðurstøða

244. Kappingareftirlitið metir, at P/f Samskifti hevur eina ráðandi støðu á viðkomandi marknað.

245. Útboð frá verandi kappingarneytum og teirra støða á marknaðinum avmarkar ikki Føroya Tele frá at hava ein óheftan atburð á marknaðinum. Í tíðarskeiðinum 2015 til 2018 hevur P/f FT Samskifti ongantíð minni enn 70% av viðkomandi marknað og P/f FT Samskifti hevur í tíðarskeiðinum styrkt um sína støðu á viðkomandi marknað.

246. Sambært lógarviðmerkingunum til § 11 í kappingarlógini er ein marknaðarpartur á 50% ein greið ábending um ráðandi støðu.

247. Føroya Tele hevur eisini 70% ella meira á øllum øðrum fjarskiftismarknaðum í Føroyum.

248. Tað er ongin verulig hóttan um víðkan av útboði frá verandi ella nýggjum kappingarneytum.

249. P/f Nema hevði eyka kapasitet í 2018, men misti marknaðarpart í tíðarskeiðinum 2015 til 2018, hóast at marknaðarvøkstur var í tíðarskeiðinum. Kundaskarin hjá P/f Nema er somuleiðis minkaður í veruligum tølum.

250. Hóttanin frá nýggjum kappingarneytum er eisini avmarkað. Tað er ósannlíkt, at nýggj fyritøka kemur inn á marknaðin við egnum farneti. Tað er meira sannlíkt, at nýggj fyritøka trínur inn á marknaðin sum MVNO. Hetta krevur, at fyritøkan sum trínur inn, hevur MVNO-avtalu við ein av verandi veitarum.

251. Ein MVNO'ari hevur tí onga trygd fyri at koma inn á marknaðin uppá eitt stutt skotbrá. Sum dømi kann nevnast felagið Sp/f Tosa, sum brúkti 2-3 ár at trína inn á marknaðin.

252. Kappingareftirlitið metir ikki, at nakar keypari hevur tingingarmegi á hesum marknað.

## 3.4 Misnýtsla

253. Hugtakið misnýtsla verður ikki skilmarkað í § 11 í kappingarlógini ella í lógarviðmerkingunum til greinina. Ásetingin sjálv ásetur einans, at misnýtsla av ráðandi marknaðarstøðu er ólóglig.

254. Tað stendur í parti C í almennu viðmerkingunum til § 11, at greinin samsvarar við grein 102 í ES sáttmálanum.[60]

255. Hetta merkir, at evropeisk rættarsiðvenja viðvíkjandi grein 102 er viðkomandi tulkingarískoyti í sambandi við mál eftir § 11 í kappingarlógini.

256. Ein nærri skilmarking av hugtakinum "misnýtsla" eftir § 11 í kappingarlógini kann tí finnast í evropeiskari rættarsiðvenju um misnýtslu hugtakið eftir grein 102 í ES Sáttmálanum.

257. Hægstirættur í ES hevur í fleiri málum roynt at allýst hugtakið misnýtsla. Í dóminum C-85/76 Hoffmann-LA Roche, para 91, verður sagt um misnýtslu hugtakið:

[60] Løgtingsmál nr. 110/2006 Uppskot til løgtingslóg um kapping

"The concept of abuse is an objective concept relating to the behaviour of an undertaking in a dominant position which is such as to influence the structure of a market where, because of the very presence of the undertaking in question, the degree of competition is weakened and which, through recourse to methods different from those which condition normal competition in products or services because of the transactions of commercial operators, has the effect of hindering the maintenance of the degree of competition still existing in the market or the growth of that competition."

258. Í Hoffmann-LA Roche verður hugtakið allýst sum ein framferð, har amboð onnur enn tey sum eru vanlig í kapping verða nýtt og sum hava ta avleiðing, at kappingin verður avlagað.

259. Hetta merkir tó ikki at tað er ein treyt, at brúkta amboðið ikki er vanligt í kapping fyri at talan skal verða um misnýtslu av ráðandi støðu.

260. Í fyrsta lagi hevur Hægstirættur í ES staðfest, at ein ráðandi fyritøka hevur eina serliga skyldu til at tryggja, at hennara atburður ikki skaðar kappingina[61]. Í øðrum lagi hevur dómstólurin á 1. rættarstigi staðfest, at serliga skyldan hjá eini ráðandi fyritøku millum annað hevur við sær, at fyritøkan í serligum førum kann verða avskorin frá framferð, sum í sær sjálvum ikki er misnýtsla og ikki var atfinningarsom, um fyritøkan ikki var marknaðarráðandi.[62,63,64]

261. Í dómunum T-340/03 France Télécom segði rætturin, at hóast ein prístillaging í mun til kappingarneytarnir í sær sjálvum ikki er ein misnýtsla, kann tillagingin gerast ein misnýtsla av ráðandi støðu, um hon hevur til endamál at styrkja og misnýta eina ráðandi støðu.[65] Í dómi T-111/96 ITT Promedia verður sagt, at ein ráðandi fyritøka, sum heldur fast um eina avtaluáseting, sum er órímilig, kann við hesi framferð hava misnýtt sína ráðandi støðu.[66] Í dómi T-65/98 Van den Bergh Foods segði rætturin, at handilslig átøk, sum hava við sær eina betring av framleiðsluni ella av útbreiðslu og sum kann fremja kapping á einum marknað við virknari kapping, kann á einum øðrum marknaði avmarka kappingina, um slíkt átak er framt av eini ráðandi fyritøku.[67]

262. Hægstirættur í ES hevur í seinni rættarsiðvenju útgreinað nærri reglubrot 91 í Hoffmann-LA Roche viðvíkjandi "methods different from those which condition normal competition". Í dómi 280/08 Deutsche Telekom v. Commission sigur dómstólurin í reglubrotið 177:

"It follows from this that Article 82 EC prohibits a dominant undertaking from, inter alia, adopting pricing practices which have an exclusionary effect on its equally efficient actual or potential competitors, that is to say practices which are capable of making market entry very difficult or impossible for such competitors, and of making it more difficult or impossible for its co-contractors to choose between various sources of supply or commercial partners, thereby strengthening its dominant position by using methods other than those which come within the scope of competition on the merits. From that point of view, therefore, not all competition by means of price

[61] C-322/81 Michelin (1), reglubrot 57
[62] T-340/03 France Télécom, reglubrot 186
[63] T-111/96 ITT Promedia, reglubrot 139
[64] T-65/98 Van den Bergh Foods, reglubrot 159
[65] T-340/03 France Télécom, reglubrot 187
[66] T-111/96 T-111/96 ITT Promedia, reglubrot 140
[67] T-65/98 Van den Bergh Foods, reglubrot 159-160

> can be regarded as legitimate (see, to that effect, Nederlandsche Banden-Industrie-Michelin v Commission, paragraph 73; AKZO v Commission, paragraph 70; and British Airways v Commission, paragraph 68)"

263. Í reglubroti 177 verður staðfest, at talan er um misnýtslu av ráðandi støðu um ráðandi fyritøkan útihýsir kappingarneyta við øðrum amboðum enn á kappingarliga grundaðar fyrimunir.

264. Í vegleiðing hjá ES kommissiónini verður sagt um kappingarliga grundaðar fyrimunir í pkt. 6:

> "The emphasis of the Commission's enforcement activity in relation to exclusionary conduct is on safeguarding the competitive process in the internal market and ensuring that undertakings which hold a dominant position do not exclude their competitors by other means than competing on the merits of the products or services they provide. In doing so the Commission is mindful that what really matters is protecting an effective competitive process and not simply protecting competitors. This may well mean that competitors who deliver less to consumers in terms of price, choice, quality and innovation will leave the market."

265. Ein positiv og ikki avmarkað tulking av kappingarliga grundaðu fyrimunum er, at talan er um kapping grundað á prís, úrval, dygd og menning. Ein ráðandi fyritøka, sum t.d. hevur lágar prísir, tó uttan at brúka ránsprísir, vørumennir, víðkar um úrval, kappast grundað á sínar kappingarligu fyrimunir.

266. Hetta merkir ikki, at ein og hvør roynd at benda áhugan hjá kundum burtur frá útboðnum hjá kappingarneyta vil verða í stríð við § 11 í kappingarlógini. Tað er júst hetta, sum fyritøkur royna at gera, tá tær koma við nýggjum vørum, lækka prísin ella menna nýggjar vørur.

267. Rætturin hjá eini fyritøku at verja síni vinnuligu áhugamál er staðfestur í evropeiskari rættarsiðvenju. Rætturin var fyrstu ferð staðfestur ú dómi C-27/76 United Brands. Í reglubroti 189-190 lýsir hægstirættur henda rætt og tess avmarkingar soleiðis:

> "Although it is true, as the applicant points out, that the fact that an undertaking is in a dominant position cannot disentitle it from protecting its own commercial interests if they are attacked, and that such an undertaking must be conceded the right to take such reasonable steps as it deems appropriate to protect its said interests, such behaviour cannot be countenanced if its actual purpose is to strengthen this dominant position and abuse it."

268. Í reglubroti 189 omanfyri verður viðurkent, at ein fyritøka hevur rætt til at verja síni vinnuligu áhugamál, um hesi verða álopin, men einans um ætlanin ikki er at styrkja um eina ráðandi støðu og misnýta hesa.

269. Í reglubroti 190 er enn ein avmarking í rættinum hjá eini ráðandi fyritøku at verja síni vinnuligu áhugamál.

> "Even if the possibility of a counter-attack is acceptable that attack must still be proportionate to the threat taking into account the economic strength of the undertakings confronting each other."

270. Sambært reglubroti 190 í dómi C-27/76 United Brands er álagt ráðandi fyritøkuni, at aftursvarið skal verða í lutfalli við ta hóttan, sum er vend ímóti vinnuligu áhugamálunum hjá ráðandi fyritøkuni. Í hesum sambandi er álagt ráðandi fyritøkuni at hava í huga egna fíggjarliga megi og hana hjá kappingarneytanum.

271. Fyri at talan skal verða um eina misnýtslu eftir § 11 í kappingarlógini, so skal framferðin verða egnað til at ávirka kappingina, og í ávísum førum er eisini krav um, at framferðin sannlíkt kann hava ávirkað kappingina.[68]

272. Tað er ikki krav um sannlíkindi, um talan er um sølu undir broytiliga kostnaðin, eksklusivavsláttur og onnur framferð beinleiðis ætlað at skaða kappingarneytan. Dømi um aðra framferð er t.d. at ein ráðandi fyritøka rindar keyparum í einum seinni handilsliði at selja vørur hjá kappingarneyta til minni áhugaverdar kundabólkar og egnar vørur til meira áhugaverdar kundabólkar[69]. Annað dømi er at taka tokskinnarar burtur á ávísari leið, soleiðis at kappingarneytar hava eina longri leið enn ráðandi fyritøkan.[70]

273. Í sambandi við aðra framferð sum t.d. prísklemmur, annan avsláttur enn ekslusivitetsavsláttur ella krav um ískoytistænastur, er neyðugt at kanna um framferðin sannlíkt hevur sum avleiðing at avmarka kappingina.

### 3.4.1 Predatory pricing

274. P/f Nema metti í síni klagu, at P/f FT Samskifti, við at geva øllum verandi og nýggjum VER-haldum 100 GB í gávu, seldi síni hald til undir kostprís í tíðarskeiðinum 25. apríl til 31. desember 2018.

275. Hóast at prískapping sum meginregla verður mett at vera kapping grundað á kappingarligar fyrimunir[71], so framgongur eisini av § 11, stk. 2 í kappingarlógini, at ov høgir prísir og ov lágir prísir kunnu verða í stríð við § 11, stk. 1 í kappingarlógini.

276. Tað er somuleiði staðfest í evropeiskari dómssiðvenju, at ikki øll prísáseting er lóglig[72].

277. Í dómi C-62/86 Akzo v. Commission ásetti hægstirættur tveir rættar standardir fyri hvussu metast skal um prísir eru ránsprísir ella ikki. Í reglubroti 71 í dóminum verður sagt, at prísir undir miðal broytiliga kostnaðin[73], eru ránsprísir í stríð við grein 102 í ES sáttmálanum. Tí ongin fyritøka kann hava handilsligan áhuga í at áseta ein prís, har undirskotið økist fyri hvørja selda eind, uttan so, at ætlanin er at útihýsa kappingarneyta.[74]

278. Í reglubroti 2 í dóminum C-62/86 Akzo v. Commission sigur dómstólurin, at eisini prísur omanfyri miðal broytiliga kostnað, men niðanfyri miðal samlaðan kostnað[75] eru misnýtsla, um ætlan er at

---

[68] Pinborg, J., Straton-Andersen, K.H. (2022) Konkurrenceloven med kommentarer, Jurist- og Økonomiforbundets Forlag, 5 udgave, síða 658-659
[69] C-413/14P, præmis 138
[70] OJ C 383, 02.10.2007, síða 7
[71] Competition on the merits
[72] C-62/86 AKZO v Commission, para 70
[73] AVC – Average Variable Cost
[74] C-62/86 AKZO v Commission, para 71
[75] ATC – Average Total Cost

útihýsa kappingarneyta. Tí tílíkir prísir kunna útihýsa ein kappingarneyta, sum er líka effektivur, men sum orsakað av fíggjarliga grundarlagnum, ikki megnar at standa ímóti tí kapping, sum verður rættað ímóti honum. [76]

279. ES kommissiónin hevur leingi verið av teirri áskoðan, at miðal broytiligi kostnaðurin og miðal samlaði kostnaðurin eru ikki væl egnað at brúka í kervisvinnunum[77] og hevur í staðin brúkt langtíðar miðal meirkostnaðurin[78] (LRAIC) og miðal umberkostnaðurin[79] (AAC). Í kervisvinnum er vanligt, at føstu kostnaðirnir eru høgir og broytiligir kostnaðir eru lágir.

280. ES Kommissiónin brúkti LRIAC fyrstu ferð í einum máli ímóti Deutche Post[80] og seinast í málinum ímóti Qualcomm[81], har ES Komissiónin grundgevur fyri nýtsluni av LRAIC:

> "According to settled case law, prices above AVC but below ATC are considered abusive where they are determined as part of a plan to eliminate a competitor[1122]. While ATC has therefore been established by the Union Courts as the upper cost benchmark for the price-cost test in a predation case, the Commission considers LRAIC to be the most appropriate cost benchmark in this case in order to calculate the minimum required rate of recovery of costs by Qualcomm for the products under investigation. This is because Qualcomm is a multi-product undertaking which benefits from economies of scope, i.e. some of its business operations do not have to be replicated for each individual product, but can be shared by all products supplied by Qualcomm (see sections 7.1 and 7.2 above). The costs incurred for such operations do not vary with the number of different products supplied ("common costs") and are therefore not taken into account in LRAIC because the latter only comprises the production costs specific to the products under investigation. Therefore, the average of all variable and fixed costs that Qualcomm incurs to produce a particular product (i.e., LRAIC) is below ATC for each individual product."

281. Nýtslan av LRAIC í staðin fyri ATC, er ikki staðfest í Evropeiskari rættarsiðvenju. Men sambandi millum LRAIC og ATC er at fyrrnevnda ongantíð er hægri enn seinna. Í kervisvinnum er LRAIC vanliga lægri enn ATC. Tað vil siga, at LRAIC er til fyrimuns fyri ráðandi fyritøkuna í einum máli um ránsprísir.

282. Kappingareftirlitið er av teirri áskoðan, at LRAIC er mest hóskandi at brúka í hesum máli, tí Føroya Tele er ein fleirtænastu veitari innan eina kervisvinnu og hevur ágóða av fleirvøru framleiðslu[82].

283. Prísáseting av fjarskiftistænastum í øðrum londum er ofta grundað á sokallaðar LRAIC-modellir, og eru slíkar modellir til staðar, so er siðvenja hjá kappingarmyndugleikum at taka støði í hesum modellum í ránsprís málum. Er hinvegin ongin modell, er tað upp til kappingarmyndugleikan at rokna LRAIC, grundað á teir kostnaðir, sum ráðandi fyritøkan hevur latið.

---

[76] C-62/86 AKZO v Commission, para 72
[77] Network industries
[78] LRAIC – Long Range Average Incremental Cost
[79] AAC – Average Avoidable Cost
[80] OJ L 125, 5.5.2001, síða 27
[81] OJ C 375, 18.7.2019, síða 7
[82] Economics of Scope

284. Tað er rættarsiðvenja, at um tað er kappingarmyndugleikin, sum ger útrokningina, so hevur myndugleikin eitt ávíst frælsi í sínum metingum.[83,84]

### 3.4.1.1 Útrokningarnar

285. Tað hevur verið ein drúgv tilgongd hjá Kappingareftirlitinum at fáa útroknað LRAIC fyri fartelefoni. Kappingareftirlitið vendi sær tann 20. januar 2020 til Føroya Tele við umbøn um at fáa útflýggja nýtslu tøl niður á hvørt kundanummar.[85] Føroya Tele svaraði tann 3. mars 2020, at øll nýtslutøl fyri kundar verða slettað eftir 6 mánaðir[86]. Einastu nýtsluhagtølini fyri 2018, vóru tøl yvir samlaðu nýtsluna hvønn mánað.

286. Kappingareftirlitið fekk tann 18. mars 2020 tøl yvir nýtsluna fyri tíðarskeiðið [...] og fram til [...][87] og eftir eina nærri greining av tølunum kom Kappingareftirlitið til ta niðurstøðu, at nýtslutøluni fyri hetta tíðarskeið kundu verða umboðandi fyri nýtsluna í apríl 2018 og fram til og við desember 2018.

287. Orsøkin til at hetta lat seg gera var, at gongdin í nýtsluni av data var hækkað yvir tíð, og var nýtslan í tíðarskeiðinum [...] og fram til [...] áleið á sama støði sum í 2018.

288. Myndin niðanfyri vísir mánaðarligu datanýtsluna í tíðarskeiðinum [....] til og við [....].

*Mynd 3-1: Mánaðarliga nýtslan av data hjá VER-kundum [...] til [...]*




Kelda: Føroya Tele, Nordic Connect

289. Sum tað framgongur av myndini omanfyri,so hækkaði mánaðarliga data nýtslan hjá Ver-kundum støðugt fram til apríl 2018. Men í apríl 2018 er ein munandi og knapplig hækkan í nýtsluni sum síðani heldur eitt støðugt støði fram til ársenda. Hetta er økt nýtsla, sum er komin orsakað av gávuni.

---

83 margin of discretion/margin of apprication
84 T-201/04 Microsoft Corp v. Commission, para 87
85 18/00268-20 Umbøn um upplýsingar send Sókn Advokatum
86 18/00268-21 Áheitan um at koma við eini frágreiðing um hví tað ikki ber til at lata umbindnar upplýsingar
87 21/00313-30 Upplýsingar frá FTS um kundanýtslu

290. Partvís er talan um nýtslu av gávuni og partvís er talan um økta nýtslu av data á haldinum orsakað av gávuni.

291. Við ársbyrjan 2019 fellur nýtslan knappliga og kemur hetta av, at gávan er farin úr gildi og kundar skulu tí tillaga sína nýtslu. Síðani byrjar nýtslan at økjast støðugt aftur. Vøksturin eftir gávuna er meinlíkur vøkstrinum áðrenn apríl 2018.

292. Støðið á nýtsluni í [....] og fram til [....] (økið millum reyðu loddrøttu strikurnar) er áleið á sama støði sum í tíðarskeiðinum, tá gávan var í gildi frá apríl 2018 og fram til árslok (økið millum bláu loddrøttu strikurnar). Av tí at miðal nýtslan í gávu gildistíðini (vatnrætta bláa strikan) er eitt vet hægri enn í tíðarskeiðinum, sum skal umboða fyrrnevnda (reyða vatnrætta strikan), so er ongin orsøk til at gera nakra rætting fyri áhaldandi vøksturin, sum er í [....] til og við [....].

293. Tær nýtsluupplýsingar, sum Kappingareftirlitið hevur fingið frá Føroya Tele fyri tíðarskeiðið [...] til og við [...], eru skipaðar soleiðis:

*Talva 3-3: Dømi um nýtsluupplýsingar frá Føroya Tele fyri tíðarskeiði [...] til og við [...]*

| Familjuhald | Familjuhald nr. | Tlf | Hald | Ár | Mánaður | Talutíð, Nýtsla | Dáta, nýtsla |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Familjuhald | 1000XX | 2202XX | VER6GB | 20XX | [....] | [....] | [....] |
| Familjuhald | 1000XX | 2202XX | VER6GB | 20XX | [....] | [....] | [....] |
| Familjuhald | 1000XX | 2202XX | VER6GB | 20XX | [....] | [....] | [....] |
| Familjuhald | 1001XX | 2575XX | VER16GB | 20XX | [....] | [....] | [....] |
| Familjuhald | 1001XX | 2575XX | VER16GB | 20XX | [....] | [....] | [....] |

Kelda: Føroya Tele

294. Hvør rekkja í talvuni vísir til eitt ítøkiligt familjuhald, telefonnummarið hjá einstaka brúkaranum, nøgdin av data, sum hoyrir til familjuhaldið, hvat ár og mánað talan er um, og hvussu nógv data og talutíð er brúkt í viðkomandi mánað.

295. Upplýsingarnar innihalda ikki SMS nýtslu og reiking. SMS nýtslan er ikki við, tí nýtslan er sera avmarkað og hevur tí onga ávirkan á útrokningarnar av LRAIC. Reiking er ikki við, talan er um ein serstaka tænastu, sum brúkarin rindar eyka fyri.

296. Tvær røðir eru lagdar afturat upplýsingunum frá Føroya Tele. Ein røð vísir tal av brúkarum í haldinum ávísa mánaðin og ein røð, sum vísir miðalprísin fyri hvønn brúkara á haldinum ávísa mánaðin.

297. Kostnaðirnir sum innganga í LRAIC-útrokningina, eru frá Føroya Tele. Kappingareftirlitið hevur móttikið viðkomandi kostnaðir fyri árini 2018,2019 og 2020.

298. Kostnaðir sum innganga í útrokningina av LRAIC, eru frá 2018 og fevna um kostnað í sambandi við talutíð og data.

299. Trý sløg av kostnaðum eru tiknir við. Kostnaður viðvíkjandi nýtslu av talutíð, kostnaður viðvíkjandi nýtslu av data upp til evsta mark í haldinum, kostnaður fyri nýtslu av omanfyri evsta mark á haldinum.

300. Nýtsla omanfyri evsta mark á haldinum er brúkt sum umboðandi gávuna, sum varð givin í apríl 2018.

301. Allir kostnaðir eru umroknaðir til krónur fyri hvørt GB uttan mun til um talan er um data ella talutíð. Sambært Føroya Tele, er kostnaðurin fyri at veita 1 GB av talutíð ella data [....] kr. Hetta merkir, at samlaði miðal kostnaðurin (ATC) hjá FT Samskifti at veita data ella talutíð, var [....] kr.

302. Fyri at kunna meta um langtíðar miðal meirkostnaðin, er neyðugt at meta um hvørjir kostnaðir fella burtur, um FT Samskifti gavst at selja fartelefoni.

303. Niðurstøðan av hesi meting var, at flest allir kostnaðir fella burtur, um fartelefoni varð niðurlagt. Nakað av leigu og starvsfólkakostnaði verða tó framvegis, um fartelefoni varð niðurlagt.

304. Langtíðar miðal meirkostnaðurin, LRAIC, fyri fartelefoni varð mettur at vera [....] kr. fyri hvørt GB av talutíð ella data.

305. Gávan frá P/f FT Samskifti varð almannakunngjørd tann 25. apríl 2018 og var í gildi fram til 31. desember 2018. Gildistíðin var tí áleið 8 mánaðir, og svarar hetta til áleið 12,5 GB av data hvønn mánað fram til árslok.

306. Útrokningin av LRAIC hevur ta avmarking, at hon einans loyvir 12,5 GB av nýtslu av gávuni hvønn mánað. Kostnaðurin á data verður roknaður í tveimum stigum.

307. Fyrst verður nýtslan av data, sum liggur innanfyri evsta mark á haldinum, faldað við LRAIC. Síðani verður nýtsla, sum liggur uttan fyri evsta mark, men innanfyri 12,5 GB, faldað við LRAIC. Fyrra stigið staðfestir hvat datanýtslan á haldinum hevur kostað, meðan seinna stigið staðfestir hvat datanýtslan av gávuni hevur kostað.

308. Tað eru fleiri útrokningar gjørdar fyri at staðfesta hvørjar avleiðingar gávan hevði við sær. Hesar eru: lutfall av haldum við negativum markvinningi[88], lutfall av haldum við negativum markvinningi, har gávunýtsla hevur verið, lutfall av haldum við negativum markvinningi, har ongin nýtsla hevur verið av gávuni, lutfall av haldum við negativum markvinningi í mun til tal av brúkarum í haldinum, lutfall av haldum við negativum markvinningi á telefonnummar støði, samlað vinningsføri, og offur kostnaður.

309. Kappingareftirlitið fer ikki at leggja øll hesi úrslit fram í hesum skjali, men samlaða kanningin er at finna sum fylgiskjal 6.1.

310. Í fylgjandi pørtum fer Kappingareftirlitið at leggja fram útrokningar viðvíkjandi lutfalli av haldum við negativum markvinningi(3.4.1.2), vinningsføri (3.4.1.3), og beinleiðis offur kostnað (3.4.1.4).

#### 3.4.1.2 Negativur markvinningur

311. Kappingareftirlitið hevur kannað hvussu nógv hald høvdu negativan markvinning, hvussu nógv hald, har ongin hevði brúkt av gávuni, høvdu negativan markvinning og hvussu nógv hald høvdu negativan markvinning, har onkur hevði brúkt av gávuni.

312. Øll trý viðurskifti hava týdning at kanna. Partvís hevur tað týdning at staðfesta, hvussu støðan var viðvíkjandi markvinningi í gildistíðini í 2018. Høvdu allir kundar ein negativan markvinning?

[88] Negativur markvinningur er prísur – (LRAIC x nýtsla)

313. Í øðrum lagi hevur tað týdning at fáa staðfest hvussu støðan er uttan gávuna, tí væntast kann at nøkur hald høvdu negativan markvinning, eisini uttan gávuna. Í hesum sambandi skal havast í huga, at gávan eisini hevur havt við sær eina økta nýtslu innan evsta mark á haldinum.

314. Í triðja lagi hevur tað týdning at fáa staðfest effektina av gávuni. Hetta kann m.a. gerast við at hyggja eftir hvussu nógv hald hava negativan markvinning og hava brúkt av gávuni.

315. Í talvuni niðanfyri er lutfallið av haldum við negativum markvinningi í 2018. Tað vil siga bæði hald, har ongin hevur brúkt av gávuni og hald, har onkur hevur brúkt av gávuni.

*Talva 3-4: Tal av haldum, tal av haldum við negativum markvinningi og lutfall í 2018*

| Hald | Antal | Antal – negativur markvinningur | Lutfall – negativur markvinningur |
|---|---|---|---|
| VER 0GB | 16 | [....] | 0-10% |
| VER 6GB | 49 | [....] | 0-10% |
| VER 16GB | 29 | [....] | 50-60% |
| VER 26GB | 6 | [....] | 70-80% |
| Tilsamans | 100 | [....] | 20-30% |

Kelda: Føroya Tele

316. Samlaða talið av haldum í LRAIC útrokningini var [....] og av hesum høvdu [....] ein negativan markvinning. Hægsta lutfallið av haldum við negativum markvinningið, vóru haldini við 26GB, har [70-80]% av haldunum høvdu ein negativan markvinning.

317. Tað sæst av talvuni, at samanhangur er millum støddina á haldinum og negativan markvinning. Tess størri haldini eru, tess størri er lutfallið av haldum við negativum markvinningi. Hinvegin sæst eisini, at fyri hvørjar 100 brúkarar eru bert 6 sum hava eitt 26GB hald, meðan 65 av 100 høvdu antin eitt 0GB ella 6GB hald.

318. Í talvuni niðanfyri er lutfallið av haldum við negativum markvinningi, har minst ein brúkari hevur brúkt av gávuni.

*Talva 3-5: Tal av haldum har brúkt er av gávuni og lutfall av haldum við negativum markvinningi í 2018*

| Hald | Antal | Antal – negativur markvinningur | Lutfall – negativur markvinningur |
|---|---|---|---|
| VER 0GB | 21 | [....] | 0-10% |
| VER 6GB | 43 | [....] | 20-30% |
| VER 16GB | 29 | [....] | 80-90% |
| VER 26GB | 8 | [....] | 90-100% |
| Tilsamans | 100 | [....] | 40-50% |

Kelda: Føroya Tele

319. Tað vóru í alt [....] familjuhald, har minst ein brúkari hevði brúkt av gávuni. Av hesum høvdu [40-50]% ein negativan markvinning. Flest hald við negativum markvinningi vóru framvegis millum 26GB haldini, men nú er eisini bróðurparturin av 16 GB haldunum, sum hava ein negativan markvinning.

320. Verða talva 3-4 og 3-5 samanbornar, so sæst, at gávan hevur eina stóra ávirkan á lutfallið av haldum við negativum markvinningi. Samstundis skal havast fyri eyga, at tað eru bert áleið ein fjórðingur av samlaðu haldunum, har brúkt er av gávuni.

321. Í talvuni niðanfyri er lutfalli av haldum við negativum markvinningi har gávan var óbrúkt í gildistíðini.

*Talva 3-6: Tal av haldum har gávan var óbrúkt í 2018 og lutfall av haldum við negativum markvinningi í 2018*

| Hald | Antal | Antal – negativur markvinningur | Lutfall – negativur markvinningur |
|---|---|---|---|
| VER 0GB | 14 | [....] | 0-10% |
| VER 6GB | 51 | [....] | 0-10% |
| VER 16GB | 30 | [....] | 30-40% |
| VER 26GB | 5 | [....] | 60-70% |
| Tilsamans | 100 | [....] | 10-20% |

Kelda: Føroya Tele

322. Samlaða talið av familjuhaldum, har ongin hevði brúkt av gávuni, var [....] og av hesum høvdu [....] ein negativan markvinning. Aftur sæst, at tess størri haldini eru, tess størri er lutfallið av haldum við negativum markvinningi, men lutføllini eru ikki líka høg, sum í talvu 3-5, har brúkt er av gávuni.

323. Talvurnar omanfyri vísa greitt, at gávan hevði ávirkan á vinningsførið hjá Føroya Tele, tí [40-50]% av haldunum, har brúkt varð av gávuni, høvdu negativan markvinning, meðan bert [10-20]% av haldunum, har gávan var óbrúkt, høvdu ein negativan markvinning.

324. Nøkur av hesum haldum hava havt negativan markvinning, tí brúkarar hava økt sína nýtslu orsakað av gávuni, men hava framvegis hildið seg innanfyri datanøgdina á haldinum.

325. Tað hevur í hesum sambandi týdning at vísa á, at haldini fáa negativan markvinning, tí nýtslan hjá einum ella fleiri brúkarum nærkast evsta markinum av data.

#### 3.4.1.3 Lønsemi

326. Kappingareftirlitið hevur útroknað munin millum samlaðu søluna av 0GB-, 6GB-, 16GB-, 26GB-haldum og frádrigið LRIC. Lønsemið er útroknað fyri 8 mánaðir við gávuni, 4 mánaðir uttan og samlað lønsemið fyri 12 mánaðir.

*Talva 3-7: Lønsemi fyri einstøku familjuhaldini í 2018*

| Hald | 8 mánaðir við gávuni | 4 mánaðir uttan gávuna | 12 mánaðir - Tilsamans |
|---|---|---|---|
| VER 0GB | [....] | [....] | [....] |
| VER 6GB | [....] | [....] | [....] |
| VER 16GB | - [....] | - [....] | - [....] |
| VER 26GB | - [....] | - [....] | - [....] |
| Tilsamans | [....] | [....] | [....] |

Kelda: Føroya Tele

327. Talvan omanfyri vísir, at Føroya Tele hevur hall av at selja størru haldini. Hetta merkir, at fulnaður er ikki fyri LRAIC í sambandi við sølu av 16Gb og 24GB. Samlaða hallið, sum stavar frá gávuni, er áleið [....] mió. kr. yvir 12 mánaðir.[89]

328. Hinvegin so gevur yvirskotið á 0Gb og 6GB haldum fulnað fyri undirskotið á størru haldunum. Samlaða yvirskotið yvir 12 mánaðir er áleið [....] mió. kr. Somuleiðis sæst, at bæði yvir 8 mánaðir við gávuni og teir 4 mánaðirnar uttan gávuna, er yvirskot við ávikavist [....] og [....] mió. kr.

329. Kappingareftirlitið metir, at tað er onki óvanligt í at størru haldini geva hall, tí fyrstu kundarnir, sum skifta yvir til størru haldini, eru ofta stórbrúkarar. Hetta er eitt eyðkenni við vinnuni.

#### 3.4.1.4 Offur

330. Kappingareftirlitið hevur gjørt útrokningar yvir beinleiðis tap av sølu og beinleiðis kostnað, fyri at fáa eina hilling av tí ofring, sum Føroya Tele hevur átikið sær í sambandi við gávuna. Tann beinleiðis søla, sum Føroya Tele hevur mist í sambandi við gávuna, er tann niðurgongd í áfyllingum, sum hendi í tíðarskeiðinum, tá gávan var í gildi.

331. Á myndini niðanfyri sæst talið av áfyllingum hvønn mánað í 2017,2018 og 2019 og miðal fyri mai til desember øll árini.

*Mynd 3-2: Áfyllingar árini 2017 til 2019 og miðal fyri mai-des øll árini*




Kelda: Føroya Tele

332. Talvan vísir, at áfyllingarnar lækkaðu í tali í apríl 2018 og fram til desember 2018, ið er sama tíðarskeið, sum gávan var í gildi.

333. Miðal áfyllingin mánaðirnar mai til desember vóru bert [....] í talið. Verður samanborið við 2017 og 2019, vóru ávikavist í miðal [....] og [....] áfyllingar hvønn mánað. Var ongin gáva latin í apríl 2018, vildi talið av áfyllingum verið á sama støði sum í 2017 og 2019.

89 [....]

334. Í útrokningini av offur kostnaði, er linæra regressión brúkt til at meta um talið av mistum áfyllingum í tíðarskeiðinum gávan var í gildi. Sambært útrokningum hjá Kappingareftirlitinum, hevur Føroya Tele mist [.....] áfyllingar, ið hava eitt handilsligt virði á 518.000 kr.

335. P/f FT Samskifti hevur, umframt at hava mist inntøkur, eisini átikið sær kostnað í sambandi við at brúkarar hava brúkt av gávuni.

336. Sambært útrokningini av LRAIC er staðfest, at VER-brúkarar brúktu [....] GB av gávuni í tíðarskeiðinum hon var í gildi. Meirkostnaðurin (LRIC) av hesi nýtslu er mettur at verða 907.000 kr., og at samlaði kostnaðurin(TC) fyri nýtsluna var 962.000 kr.

337. Brúkarar hava tó eisini økt sína nýtslu av data á haldinum, meðan gávan var í gildi. Í fyrsta lagi krevur tað at data á haldinum er brúkt, áðrenn brúkt verður av gávuni. Umframt hesa nýtslu, hava brúkarar yvirhøvur brúkt meira data í gildistíðini, tí yvirflóð var av data.

338. Fyri at staðfesta hesa eyka nýtslu, er meting gjørd av hvat nýtslan hevði verið, um gávan ikki varð latin. Hetta er gjørt við at gera eina liniera regressión við støði í nýtsluni áðrenn og eftir gávu tíðarskeiðið.

339. Eyka nýtslan á haldunum orsakað av gávuni var [.....] GB og meirkostnaðurin(LRIC) var 6,9 mió. kr. og samlaði kostnaðurin (TC) var 7,3 mió. kr.

#### 3.4.1.5 Ávegis niðurstøða

340. Kappingareftirlitið hevur kannað kostnað og inntøkur hjá P/f FT Samskifti í sambandi við sølu av fartelefoni í 2018. Niðurstøðan er, at P/f FT Samskifti brúkti prísir, sum góvu fulnað fyri langtíðar miðal meirkostnaðin (LRIC) í tíðarskeiðinum 25. apríl til 31. desember 2018. Somuleiðis var fulnaður fyri prísunum yvir 12 mánaðir(partur 3.4.1.3).

341. Sambært evropeiskari rættarsiðvenju, er ránsprísásetan staðfest um prísur ikki dekkar AAC ella um prísur ikki dekkar LRAIC og prógv um ætlan at útihýsa kappingarneyta fyriliggur.

342. Kanningin hjá Kappingareftirlitinum staðfesti, at prísirnir hjá P/f FT Samskifti góvu fulnað fyri LRAIC og góvu 7 mió. kr. í ískoyti til felagskostnaðin í tíðarskeiðinum apríl 2018 til desember 2018.

343. Kappingareftirlitið metir seg hava staðfest, at hóast fulnaður var fyri kostnaði, so hevði gávan stóra ávirkan á lønsemi hjá Føroya Tele, tí talið av haldum við negativum markvinningi øktist í tíðarskeiðinum(partur 3.4.1.2).

344. Kappingareftirlitið hevur eisini staðfest, at Føroya Tele hevur ofrað inntøkur og somuleiðis átikið sær ein størri meirkostnað í sambandi við gávuna (partur 3.4.1.4).

### 3.4.2 Annar útihýsandi atburður

345. Øll útihýsandi framferð er ikki í stríð við § 11 í kappingarlógini. Tann útihýsandi framferðin, sum er í stríð við § 11 í kappingarlógini, er hon sum byrgir marknaðin av fyri kappingarneytum á ein kappingaravlagandi hátt og við hesum ávirkar vælferðina hjá brúkarum negativt.[90]

346. Her skal tí skiljast ímillum útihýsandi framferð, sum fremur kapping og útihýsandi framferð, sum skaðar kappingina. Dømi um útihýsandi framferð, sum fremur kapping, er tá tann ráðandi fyritøkan bjóðar út tænastur ella vørur, sum eru betri enn hjá kappingarneyta í mun til prís, úrval og dygd.

347. Avleiðingin av hesi kapping kann verða, at kappingarneytin missir marknaðarpart ella enntá gevst á marknaðinum, men talan er um ein kappingarneyta, sum ikki megnar at bjóða brúkaranum tað úrval av vørum til ta dygd og tann prís, sum brúkarin ynskir.

348. Hinvegin er talan um útihýsandi framferð sum skaðar kappingina, tá tann ráðandi fyritøkan tekur onnur amboð í brúk enn tey, sum eru vanlig í kapping.[91] Eins og omanfyri vil avleiðingin verða, at kappingarneytin missir marknaðarpart ella enntá gevst á marknaðinum, men brúkarin fær ikki neyðturviliga tað úrval av vørum til ta dygd og tann prís, sum brúkarin ynskir, tí útihýsandi framferðin kann gott viðføra, at ein líka effektivur kappingarneyti missir marknaðarpart ella gevst á marknaðinum. Tað vil siga, at brúkarin missir vælferð.

349. Kappingareftirlitið metir, at tá Føroya Tele valdi at geva øllum kundum 100 GB av data at brúka í 8 mánaðir, tók Føroya Tele til onnur amboð enn tey, sum eru vanlig í kapping.

350. Føroya Tele ynskti við gávuni at oyðileggja marknaðarføringina av Datarull fyri at tryggja, at tænastan ikki skuldi fáa undirtøku. Hetta varð gjørt við at floyma marknaðin við ókeypis data í tíðarskeiðinum Datarull varð bjóðað út á marknaðinum.

351. Tað er sum meginregla ikki eitt krav fyri at staðfesta brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini, at endamálið hevur verið at avmarka kappingina. Hinvegin kann eitt endamál um at avmarka kappingina innganga í staðfestingini av um misnýtsla er farin fram.[92]

352. Kappingareftirlitið var á eftirlitsvitjan hjá Føroya Tele tann 21. januar 2021 og tók speglingar av ymiskum tólbúnaði. Í speglingunum var millum annað teldupost samskifti millum leiðslupersónar í Føroya Tele um Datarull og teldupost samskifti millum leiðslupersónar og serfrøðingar í Føroya Tele um Datarull.

353. Kappingareftirlitið metir, at samskiftið vísir heilt greitt, at endamálið við gávuni var at Datarull ikki skuldi fáa undirtøku, tí Føroya Tele hevði ávísan illvilja ímóti slíkum tænastum. Samskiftið vísir eisini heilt greitt, at Føroya Tele umhugsaði at taka til amboð, sum vóru vanlig í kapping, men valdi heldur at taka til onnur amboð enn tey, sum eru vanlig í kapping.

354. Í parti 3.4.2.1 verður hetta samskiftið gjøgnumgingið í tíðarrøð og har sum annað tilfar er viðkomandi, verður hetta tikið fram eisini.

[90] OJ C 45, 24.2.2009
[91] Competiting on the merits
[92] T-321/05 AstraZeneca, reglubrot 359

### 3.4.2.1 Samskifti og annað tilfar frá Føroya Tele

355. Viðvíkjandi teldupost samskiftinum er viðkomandi at vísa á, at tað er frá leiðslupersónum og persónum við servitan innan sítt yrki. Talan er sostatt um fólk, sum hava hollan kunnleika um viðurskifti á viðkomandi marknaði og eina holla vitan um fjarskifti.

356. Havandi í huga, at marknaðarbygnaðurin á viðkomandi marknaði var duopol, ið er ein sera einfaldur bygnaður, støðuna hjá Føroya Tele á hesum marknaði, t.v.s. marknaðarpart, fyrrverandi monopol, heilsølumonopol o.s.fr., so er tað Kappingareftirlitsins áskoðan, at hesir leiðslupersónar sum meginregla vita hvat avleiðing ein ávís framferð á marknaðinum vil føra við sær.

357. Samskifti byrjar tann 18. apríl 2018 sum er dagurin har Nema almannakunngjørdi Datarull.

**Mikudagin, 18 apríl 2018**

| |
|---|
| Datarull varð almannakunngjørt kl. 12:30 á millum annað www.vp.fo undir yvirskriftini "Hey fremur nýbrot innan føroyskt telefoni".[93]<br><br>Kl. 12:45 [Deildarstjórin] á Føroya Tele kunnar síni starvsfólk um nýggju tænastuna hjá P/f Nema[94]. Síðani verða viðkomandi persónar í leiðsluni og leiðarar kunnaðir.<br><br>Kl. 12:50 [Ovasta leiðsla] gevur boð til útvaldar persónar um at kanna átakið hjá P/f Nema og koma við einum tilmæli um aftursvar.[95]<br><br>Restina av arbeiðsdegnum verður brúktur til at fyrireika sølu- og móttøkufólk hvussu svarast skal kundum í sambandi við átakið frá P/f Nema.[96,97,] |

358. Sum tað framgongur av samskiftinum tann 18. apríl 2018, gingu bert 15 minuttir frá almannakunngerðingini av Datarull til [deildarstjórin] var vitandi um átakið. Síðani gingu bert 5 minuttir til [ovasta leiðsla] í Føroya Tele hevði givið fyrstu boðini um aftursvar.

359. Havandi í huga, at talan er um eitt duopol og hvussu tænastur verða seldar á viðkomandi marknað, er greitt, at Føroya Tele hevur møguleika at hava eitt fullkomið eftirlit við framferðini hjá P/f Nema á viðkomandi marknaði.

**Hósdagin, tann 19 apríl 2018**

| |
|---|
| Kl. 8:44 [leiðslupersónur] kemur við fyrsta uppskotinum um aftursvar. Í telduposti til persónar í leiðslubólkinum verður mælt til at lækka prísin á øllum haldum bæði vinnu og privat við [....] kr.[98]<br><br>Kl. 10:18 Starvsfólk kemur við uppskoti um at geva øllum nøkur fá GB tann 25. apríl 2018 fyri at fagna Merkinum í sambandi við flaggdagin.[99]<br>Kl. 13:31 [Deildarstjórin] sendur ein teldupost við eini power-point framløgu. Heiti á framløguni er "Aftursvar til Nema". [100] |

---

[93] P/f Nema (2018, apríl 18). "Hey fremur nýbrot innan føroyskt telefoni". Vágaportalurin. http://www.vp.fo/news/hey-fremur-nybrot-innan-foroyskt-telefoni
[94] KE-DE0011: Teldupostur sendur 18. apríl 2018, kl.12:46, mailservari, brúkari: [....]
[95] KE-DE0015: Teldupostur sendur 18. apríl 2018, kl. 12:50, mailservari, brúkari: [....]
[96] KE-DE0011: Teldupostur sendur 18. apríl 2018, kl. 14:45, mailservari, brúkari: [....]
[97] KE-DE0011: Teldupostur sendur 18. apríl 2018, kl. 19:52, mailservari, brúkari: [....]
[98] KE-DE0011: Teldupostur sendur 19. apríl 2018, kl. 08:44, mailservari, brúkari: [....]
[99] KE-DE0011: Teldupostur sendur 19. apríl 2018, kl. 10:18, mailservari, brúkari: [....]
[100] KE-DE0011: Teldupostur sendur 19. apríl 2018, kl. 13:31, mailservari, brúkari: [....]

Framløgan inniheldur tilmæli um príslækking frá [leiðslupersóni] og og tilmælið um gávu í sambandi við flaggdagin.

Eitt triðja uppskot er eisini í framløguni og snýr hetta seg um at foreldur kunnu geva sínum børnum óbrúkt data frá inniverandi mánað. Í viðmerkingunum til framløguna verður sagt, at fyrimunurin við hesi tænastu er at ongin uppsparing fer fram og er tænastan léttari at umsita og taka av í framtíðini.

Kl. 17:13 [Deildarstjórin] stovnar eina nýggja power-point framløgu við heitinum "Aftursvar til Nema – apríl 2018". [101]

Framløgan inniheldur fylgjandi uppskot

- Ein gáva til verandi VER-kundar á 40 GB at brúka í mai 2018.

- Alt Evropa skal dekkast av VerSumHeima. Er avtala ikki fingið í lag við feløg í Bosnia og Moldova, so skal Føroya Tele sjálvt bera váðan fyri hesi øki.

- Nýggj tænasta: Deil data millum familjulimir.

- Menning av nýggjari Ver-app.

- Flyta fleiri lond í reikingar bólk tvey, tí ábendingar eru um, at Nema kann ikki bjóða kappingarførar prísir í hesum bólki.

- Nýtt hald: 1 GB hald

360. Tað er vert at leggja til merkis í hesum samskifti, hvat leiðslupersónar og serkøn annars innan hesa vinnu meta verða eitt hóskandi handilsligt aftursvar til átakið hjá P/f Nema. Somuleiðis er eisini vert at leggja til merkis, hvussu stór hóttan hesir persónar meta eina ókeypis ískoytistænastu á haldunum hjá P/f Nema vera.

361. [leiðslupersóni] heldur at ein príslækking á bæði vinnu og privat haldum á [....] kr. er eitt hóskandi aftursvar til Datarull. Kostnaðurin av hesum varð mettur at verða [....] mió. kr. og her skal havast í huga, at í 2018 og 2017 hevði P/f FT Samskifti eitt ársúrslit, eftir skatt, á áleið [....] mió. kr. Tað vil siga, at stjórin mælti til at ofra 30-40% av ársúrslitinum uppá eitt aftursvar til Datarull.

362. Hetta er ein greið ábending um ta hóttan, sum leiðslupersónur í Føroya Tele samtakinum heldur Datarull verða fyri teirra virksemi á viðkomandi marknað.

363. [Deildarstjórin] metir, at ein nýggj tænasta, har limir í einum VER-familjuhaldi kunna eiga data saman, vildi verið eitt hóskandi handilsligt aftursvar til Datarull.

364. [Deildarstjórin] sær tað sum ein fyrimun, at nýggja tænastan ikki hevur við sær at data verður spart upp. Hetta vísir ein mótvilja ímóti tænastum, sum geva kundum møguleika at spara data upp. Hetta verður eisini stuðlað av, at ein annar fyrimunir við tænastuni er at hon er løtt at avtaka.

365. Í framløguni, sum [deildarstjórin] stovnar henda dagin, er eitt av fleiri uppskotum ein gáva á 40 GB til verandi kundar við gildi í 30 dagar.

366. Tað er vert at leggja til merkis, at tað er [deildarstjórin] sum metir, at 40GB við 30 daga gildistíð og einans til egnar kundar, er hóskandi í hesum føri.

[101] KE-DE0011: Power Point stovnað 19. apríl 2018, kl. 17:13, user drev. brúkari [....]

367. Í viðmerkingunum til fyrstu síðu í framløguni sæst eisini hví hann vil geva hesa gávu. Hann vil keypa sær tíð til at tilevna eitt veruligt handilsligt aftursvar[102], har hini uppskotini kunnu innganga.

### Fríggjadagin, tann 20. apríl 2018

> Kl. 15:49 [Deildarstjórin] sendur ein teldupost til sín [undirleiðara]. Hjálagt er eitt grafiskt yvirlit yvir hansara uppskot um eina familjudeiling tænastu. Tænastan hevur heitið "Datadeiling til húsarhaldið". [103]
>
> Í sjálvum teldupostinum skrivar [deildarstjórin], at hann er farin at ivast í um nýggja tænastan í nóg stóran mun vil flyta fokus burtur frá Datarull. Hann er eisini í iva, tí nýggja tænastan kemur at verða óviðkomandi fyri 44% av VER-kundunum, tí hesir hava bert ein brúkara á haldinum.
>
> Hann hellur tí meira til at geva eina gávu á 40GB í 30 dagar og bjóða VerSumHeima til alt Evropa.[104]
>
> Kl. 16:22 [Undirleiðarin] svarar [deildarstjóranum] at fáa alt evropa í VerSumHeima hevði verið ein góður boðskapur, og er samd um at tað kann geva bakslættur um 44% ikki kunna fáa ágóðan av nýggju tænastuni. [Undirleiðarin] skjýtur eisini upp at fíggjardeildin verður sett at kannað hvat vil henda um Føroya Tele kom við sínari egnu datarull tænastu.

368. Tað eru serliga tvey viðurskifti, sum eru áhugaverd í samskiftinum henda dagin. Í fyrsta lagi sæst, at tvey, sum arbeiða [....] innan fjarskifti hava ta fatan, at ein gáva á 40GB í 30 dagar kann brúkast sum amboð til at frysta marknaðarstøðuna í 30 dagar. Við øðrum orðum, um P/f FT Samskifti hevði valt at geva øllum Ver-kundum eina gávu á 40GB í 30 dagar, vildi avleiðingin sambært teimum verið, at marknaðarparturin hjá FT Samskifti varð tikin úr kappingini millum feløgini í 30 dagar.

369. Í øðrum lagi vísir samskiftið eisini, at Datarull varð mett at verða ein hóttan fyri virksemið hjá Føroya Tele á viðkomandi marknað. Tann sannroynd at tey umhugsa at geva eina gávu fyri at fasthalda støðuna til tey sjálvi eru klár við einum átaki, er greið ábending um hetta. Somuleiðis er tað at [undirleiðarin], hóast mótvilja í Føroya Tele ímóti slíkum tænastum, skjýtur upp at koma við egnari datarull tænastu, ein ábending um ta hóttan, sum Datarull verður mett at verða.

### Sunnudagin, tann 22. apríl 2018

> Kl. 22:28 [Deildarstjórin] sendur teldupost til sín [undirleiðara við einum uppskoti um at bunta fast breiðband og fartelefoni. Hetta skal gerast við at geva ein avsláttur á prísin á fast breiðbandi ella at geva meira data á Ver-haldi, um kundin bæði hevur sítt fast breiðband hald og sítt fartelefoni hald í sjálvsgreiðslu platforminum Ver. [Deildarstjórin] heldur framvegis, at besta leið er at fáa alt evropa í VerSumHeim, uttan mun til um avtalur eru við Moldova og Bosnia ella ikki. [105]
>
> Kl. 22:37 [Undirleiðarin] skjýtur upp í telduposti, at P/f FT Samskifti kemur við egnari datarull tænastu. Hetta vil koma øllum Ver-kundum til góðar og man kann avmarka data goymsluna til 90 dagar. [Undirleiðarin] tekur undir við stjóranum um at

[102] KE-DE0011: Power Point stovnað 19. apríl 2018, kl. 17:13, user drev. brúkari [....]
[103] KE-DE0011: Teldupostur sendur 20. apríl 2018, kl. 15:49, mailservari, brúkari [....]
[104] KE-DE0011: Teldupostur sendur 20. apríl 2018, kl. 15:49, mailservari, brúkari [....]
[105] KE-DE0011: Teldupostur sendur 22. apríl, kl. 22:28, mailservari, brúkari [....]

VerSumHeima má hava hægstu raðfesting og bunting av fartelefoni og fast breiband.[106]

Kl. 22:47 [Deildarstjórin] sendur ein teldupost til [undirleiðaran], har hann kunnar um, at tveir starvsfelagar hava fingið til uppgávu at fyrireika eina gávu á 40GB, men spyr sín [undirleiðara] um hon heldur at 40 GB verða ov nógv.

370. Tað eru tvey viðurskifti av týdningi í samskiftinum tann 22. apríl 2018. Fyrsta viðurskifti av týdningi er, at [undirleiðarin] einaferð enn kemur við uppskoti um egna datarull tænastu. Enn sum áður fær [undirleiðarin] onga afturmelding frá sínum stjóra um hetta.

371. Vantandi afturmeldingin er heldur løgin, tí talan er um samskifti millum tveir serfrøðingar innan marknaðarføring og produktmenning, sum hava eina *brainstorming* um eitt aftursvar til seinasta átakið hjá kappingarneytanum. Tað vildi verið vanligt í slíkari tilgongd, at øll uppskot fáa eina viðgerð. Hetta hevur eisini eyðkent samskiftið higartil millum [deildarstjóran] og [undirleiðaran].

372. Tað vildi verið ein natúrlig strategi hjá eini fyritøku, sum situr á 70% av einum marknaði, at eftirgera øll átøk hjá kappingarneytum, fyri at fasthalda støðuna á marknaðinum, hetta er serliga galdandi á einum duopol marknað.

373. Kappingareftirlitið metir tí, at omanfyristandandi er ein greið ábending um ein mótvilja í Føroya Tele ímóti at knýta ókeypis datarull tænastur til Ver-haldini. Havandi í huga marknaðarbygnaðin, er omanfyristandandi eisini ein ábending um, at Føroya Tele ikki ynskti at slík tænasta fekk undirtøku á viðkomandi marknað, tí tá vildi Føroya Tele sjálvt verið tvingað at komið við egnari datarull tænastu.

374. Stuðul fyri hesum kann eisini finnast í fundarfrágreiðing frá fundi millum Kappingareftirlitið og Føroya Tele tann 22. apríl 2021.[107] Á fundinum spurdi Kappingareftirlitið hví Føroya Tele ikki hevði valt at koma við egnari datarull tænastu sum aftursvar.

375. Umboð fyri Føroya Tele segði millum annað, at Føroya Tele hevði ikki hug at bjóða tílíka tænastu fram. Sambært Føroya Tele vildi slík tænasta skapt ein óynsktan kompleksitet á marknaðinum, tí ein rúgva av kundum koma at hava eina rúgvu av data, sum teir ongantíð koma at brúka.

376. Umboðið fyri Føroya Tele greiddi frá, at Føroya Tele kundi bert økja sína inntjening við at fáa fólk at velja eitt størri hald enn tey longu høvdu. Sambært umboðnum tvífaldast datanýtslan annað hvørt ár á føroyska marknaðinum, men nýtslan er framvegis aftanfyri tí donsku nýtsluna.

377. Kappingareftirlitið spurdi síðani umboðið fyri Føroya Tele, um hesin kompleksitetur hevði havt við sær, at tað vildi tikið longri tí at flutt kundar upp í størri hald. Umboðið svaraði, at tað kundi væl hugsast.

378. Næsta viðurskifti av týdningi at taka fram úr samskiftinum tann 22. apríl 2018 er, at [deildarstjórin] hevur biðið eitt starvsfólk fyrireikað eina gávu á 40GB, men ivast í um 40GB er ov nógv at bjóða. Hetta er áhugavert, tí Føroya Tele hevur í sambandi við hetta mál sagt, at ein gáva á 100GB var

---

[106] KE-DE0011: Teldupsotur sendur 22. apríl, kl. 22:37, mailservari, brúkari [....]
[107] 21/00313-9: Fundarfrásøgn frá fundi tann 22 apríl 2021 - endalig

ikki óvanlig á marknaðinum, men í samskiftinum henda dagin, ivast [deildarstjórin] um 40GB er ov nógv at geva.

379. Sum prógv fyri, at 100GB ikki var óvanlig gáva á marknaðinum, hevur Føroya Tele latið Kappingareftirlitinum eitt yvirlit yvir átøk í tíðarskeiðinum 2015 til 2019:

> **2015, mai:** Ver fyllur 1 ár og allir Ver kundar fáa 1GB av eyka data at nýta ókeypis í Føroyum í mai 2015.
>
> **2015, juni-juli:** Allir Ver kundar, ið keypa atgongumerki til kappróðarnir, fáa 1GB í gávu pr. kappróður. Hetta er í samband við at Ver er høvuðsstuðul hjá Róðarsambandi Føroya og tí eigur lýsingarkarmin rundan um róðrarnar. Ein gávukota varð prenta á hvørt atgongumerki.
>
> **2015, desember:** Ver lat kundunum 24GB at nýta í FO í desember mánaði.
>
> **2016, mai:** Ver fyllur 2 ár og allir Ver kundar fáa 2GB av eyka data at nýta ókeypis í Føroyum í mai 2016.
>
> **2016, juni-juli:** Allir Ver kundar, ið keypa atgongumerki til kappróðarnir, fáa 1GB í gávu pr. kappróður. Hetta er í samband við at Ver er høvuðsstuðul hjá Róðarsambandi Føroya og tí eigur lýsingarkarmin rundan um róðrarnar. Ein gávukota varð prenta á hvørt atgongumerki.
>
> **2016, juli:** Steypafinalan í fótbólti – Ver kundar kundu undir dystinum smsa ver til 1990 og fingu 1G at brúka í Føroyum næstu 30 dagarnar.
>
> **2016, juli-august:** Ver hevur fingið Pokémon GO fepur. Hvønn MÁNADAG til og við 15. august bjóða vit ókeypis data í Telebúðini til kundar hjá Ver. Um tú hevur gingið meira enn 5 kilometra fært tú 1GB data, tá tú vísir okkum, hvussu nógvar kilometrar tú hevur gingið við Pokémon GO.
>
> **2017, juli:** Steypafinalan í fótbólti – Ver kundar kundu undir dystinum smsa ver til 1990 og fingu 2G at brúka í Føroyum næstu 30 dagarnar.
>
> **2018, apríl:** Ver fyllur 4 ár og letur kundum 100B at nýta í FO árið út.
> - *Verður hetta umroknað til miðal pr. mðr, svarar hetta til áleið 11 GB.*
>
> **2019, mai:** Ver fyllur 5 ár og allir Ver kundar fáa 5GB av eyka data at nýta ókeypis í Føroyum í mai 2019.
>
> **2019, juni-juli:** Allir Ver kundar, ið keypa atgongumerki til kappróðarnir, fáa 5GB í gávu pr. kappróður. Hetta er í samband við at Ver er høvuðsstuðul hjá Róðarsambandi Føroya og tí eigur lýsingarkarmin rundan um róðrarnar. Ein gávukota varð prenta á hvørt atgongumerki.

380. Kappingareftirlitið er av teirri fatan, at yvirlitið tvørturímóti er eitt prógv um, at gávan tann 25. apríl 2018 var bæði óvanlig í støðd og óvanliga treytaleys.

381. Yvirlitið vísir greitt, at Føroya Tele vanliga bjóðar eitt avmarkað tal av GB og við meira umfatandi treytum. Treytirnar hava antin verið, at kundin skuldi keypa eitthvørt fyri at fáa gávuna ella ímóti at luttaka í onkrum tiltaki, har Føroya Tele samtakið var sponsorur. Felags fyri gávurnar er, at tær hava eitt greitt handilsligt endamál.

382. Leggjast skal afturat, at Føroya Tele hevur hvørki áðrenn ella eftir apríl 2018 latið somikið stóra gávu, við so langari gildistíð og uttan treyt um keyp ella luttøku.

383. Samanumtikið kann sigast um gávuna á 100GB, at hon var bæði óvanlig í støðd, í gildistíð og treytum. Gávan gav onga handilsliga meining, uttan sum eitt amboð til at oyðileggja marknaðarføringina av eini tænastu. Føroya Tele ynskti ikki, at Datarull skuldi fáa undirtøku á marknaðinum, tí so vildi Føroya Tele sjálvt verið tvungið at komið við egnari datarull tænastu ella líknandi tænastu.

**Mánadag, 23. apríl 2018**

Frá kl. 12:00 til 13:00 er leiðslufundur í [ovastu leiðslu] í Føroya Tele samtakinum. Fundarboðini eru send tann 20. apríl 2018, kl. 15:27 og hava yvirskriftina "Uppskot Ver reaktión uppá Hey".[108] Luttakarar eru [deildarstjórin], [persónur í ovasta leiðslu], [persónur í ovastu leiðslu], [persónur í ovastu leiðslu] og [leiðslupersónur]

Kl. 22:09 [Deildarstjórin] sendur ein teldupost til starvsfólk á síni deild. Telduposturin inniheldur eitt uppskot um orðing av einum SMS.

"Góði kundi

Ver fyllir 4 ár, og tá eru vit í gávuhýri. Í hesum sambandi hava vit sett 40GB data á títt Ver-hald sum tøkk afturfyri, at tú er kundi okkara. Hesi 40GB eru galdandi restina av árinum, so tað er upp til tín, hvussu tú brúkar tey. Ger so væl og góðan flaggdag!

Vinarliga

Ver"[109]

Kl. 22:43 [Deildarstjórin] sendur ein teldupost til innanhýsis KT starvsfólk, har hann greiðir frá, at hann ynskir onkursvegna at binda gávuna til SONA. Hann spyr um tað ber til at fáa innlisið eitt avmarkað tal av virðisseðlum inn á SONA, sum brúkarar av SONA hava møguleika at fáa hendur á. Hann hugsar virðisseðlar á 80GB.[110]

384. Kappingareftirlitið metir, at [deildarstjórin] hevur lagt fram uppskotið um at geva verandi kundum 40GB í 30 dagar, fyri at fáa stundir til at seta í verk eitt veruligt handilsligt aftursvar.

385. Tað er ongin fundarfrágreiðing frá fundinum henda dagin, men støðan er tann, at seinni um kvøldið sendur [deildarstjórin] eitt uppskot um gávu, sum inniheldur 40GB til verandi kundar, men við broyttari gildistíð til árslok.

386. Gildistíðin gevur lítla meining, um støði verður tikið í tí samskifti, sum hevur verið millum [deildarstjóran] og [undirleiðaran]. Tey hava ongantíð umrøtt eina gildistíð uppá 8 mánaðir og upprunaliga endamálið við gávuni var at fasthalda marknðarstøðuna í 30 dagar.

387. Talan má tí verða um eina avgerð, sum er tikin á umrødda leiðslufundi og sum hevur havt eitt annað endamál.

388. Í hesum sambandi er viðkomandi at vísa á, at gávan, sum var givin tann 25. apríl í 2018, breyt burtur frá árini frammanundan og árini eftir. Í apríl 2015 fingu allir VER-kundar 1GB eyka at brúka í mai, í 2016 fingu allir Ver-kundar 2GB, kundar fingu bjóðað góð tilboð uppá snildfonir og lutakast var um tvey familjuuppihald á Hotel Skálavík[111]. Í 2017 varð ongin gáva givin, men í 2019 fingu allir VER-kundar 5GB at brúka í mai mánað, umframt at kundi nr. 5, sum kom inn í telebúðirnar á føðingardegnum, fekk eitt gávukort á 2.000 kr. Í 2020 var ongin føðingardagur, meðan í 2021 fingu øll hald 1 GB eyka at brúka í sambandi við føðingardagin.

389. Tað er eyðsæð, at gávan tann 25. apríl 2018 var óvanlig samanborið við føðingardagarnar undan og eftir. Støddin á gávuni, gildistíðin og treytir vóru óvanligar, samstundis sum torført er at síggja

[108] KE-DE0011: Fundarinnkalling send tann 20. apríl 2018, kl. 15:27, mailservari, brúkari: [....]
[109] KE-DE0011: Teldupostur sendur tann 23. apríl 2018, kl. 20:09, mailservari, brúkari: [....]
[110] KE-DE0011: Teldupostur sendur tann 23. apríl 2018, kl. 22:43, mailservari, brúkari: [....]
[111] Skjal: 21/00313-28: Føðingardagar hjá VER

hvat handilsliga endamálið var við gávuni, um ætlanin ikki var at tryggja, at Datarull hjá P/f Nema ikki skuldi fáa undirtøku á marknaðinum.

390. Í teldupostinum tann 23. apríl 2018, kl. 22:43 biður [deildarstjórin] eitt KT-fólk kanna um tað er møguligt at gera nakrar virðisseðlar, sum kundar bert kundu fáa atgongd til umvegis Sona.

391. Kappingareftirlitið metir, at hetta er ein roynd hjá [deildarstjóranum] at koma við einum átaki, sum kundi flyta fokus burtur frá átakinum hjá P/f Nema, sum hevði tað handilsliga endamál at skapa ferðslu á Sona og sum var meira avmarkað í støðd og gildistíð. Eitt átak sum hetta, vildi verið meira í tráð við tað, sum hevði verið árini frammanundan.

**Týsdag, tann 24. apríl 2018**

Kl. 10:10 [Deildarstjórin] sendur ein teldupost til [undirleiðaran], hjálagt eitt rokniark. Í rokniarkinum er ein útrokning, sum vísir hvat tað kostar at seta prísin niður við 20 kr. Sambært útrokningini, vildi hetta kostað áleið 1 mió. kr. yvir 12 mánaðir.[112]

Kl. 11:45 til 13:00 er ein fundur í ovastu leiðsluni, har [deildarstjórin], [persónur í ovastu leiðslu], [persónur í ovastu leiðslu], [persónur í ovastu leiðslu] og [undirleiðari] á [...]deildini. Fundurin var innkallaður av [deildarstjóranum] tann 23. apríl 2018, kl. 21:34 undir heitinum "Recap Hey".[113] Í innkallingini stendur: "Taka samanum frá í dag av, hvat vit gera og í hvørjari rekkjufylgju".

Kl. 12:36 [Deildarstjórin] fær ein teldupost frá KT starvsfólkinum, sum skuldi kanna møguleikarnar við Sona. KT starvsfólkið sigur, at tað er ikki møguligt at fremja hugskotið hjá [deildarstjóranum].[114]

Kl. 13:08 [Deildarstjórin] sendur ein teldupost til eina lýsingarfyritøku og biður um at fáa eitt uppskot til eina lýsing um at allir verandi Ver-kundar fáa eina gávu á 100GB at brúka fram til ársenda.[115]

Kl. 13:44 Marknaðar og produktstjórin móttekur ein teldupost frá [undirleiðaranum] við uppskoti til orðing av einum SMS. Í hesum uppskoti stendur, at eisini nýggir kundar, sum skifta yvir til Ver áðrenn 31. juli 2018, fáa gávuna.[116]

392. Telduposturin sum [deildarstjórin] sendur til sín [undirleiðara] kl. 10:10, inniheldur eitt uppskot um eina møguliga príslækking á [....] kr. Hetta vísir, at Føroya Tele var sinnað at ofra av botnlinjuni fyri at tryggja, at Datarull ikki fekk undirtøku á viðkomandi marknaði.

393. Kappingareftirlitið metir hetta verða enn eina greiða ábending um, at endamálið við gávuni var bert at oyðileggja marknaðarføringina av Datarull til tess at tryggja, at tænastan ikki fekk undirtøku.

394. Samstundis er hetta enn ein greið ábending um ta hóttan, sum Føroya Tele metti at henda nýggja ókeypis tænastan var fyri virksemið á viðkomandi marknaði, tí man var sinnaður at ofra [....] mió. kr. í inntøkum fyri náa endamálinum.

395. Tað framgongur greitt av samskiftinum henda dagin, at [deildarstjórin] er á fundi í ovastu leiðsluni um hvussu svarast skuldi aftur uppá átakið hjá P/f Nema. Hann móttekur boð um, at ætlanin

[112] KE-DE0011: Telduposturin sendur tann 24. apríl 2018, kl. 10:10, mailservari, brúkari: [....]
[113] KE-DE0011: Fundarinnkalling send tann 23 apríl 2018, kl. 21:34, mailservari, brúkari: [....]
[114] KE-DE0011: Teldupostur móttikin tann 24. apríl 2018, kl. 12:36, mailservari, brúkari: [....]
[115] KE-DE0011: Teldupostur sendur tann 24. apríl 2018, kl. 13:08, mailservari, brúkari: [....]
[116] KE-DE0011: Teldupostur móttikin tann24. apríl 2018, kl. 13:44, mailservari, brúkari: [....]

viðvíkjandi Sona ber ikki til. Átta minuttir eftir fundin gevur [deildarstjórin] boð til eina lýsingarfyritøku. Ein lýsing skal fyrireikast við boðum um, at allir verandi kundar fáa 100GB data fram til ársenda.

396. Kappingareftirlitið metir, at 100GB gávan til allar verandi kundar er brot á § 11 í kappingarlógini, tí gávan er egnað til at fastfrysta marknaðarstøðuna fram til ársenda. Gávan svarar til 12,5 GB data hvønn mánað fram til ársenda. Hetta svarar til 2-3 ferðir nýtsluna hjá einum miðal kunda í 2018.

397. Gávan hevur ta avleiðing, at kundar hjá FT Samskifti hava onga orsøk til at skifta yvir til P/f Nema fyri at fáa Datarull, tí teir hava ovmikið av data á haldinum. Uppsparing av data gerst óviðkomandi fyri kundar hjá FT Samskifti.

398. Nakað seinni, kl. 13:44, verður ein munandi broyting gjørd, tí nú verða tey 100GB eisini bjóðað til privatu kundarnar hjá P/f Nema. Í uppskotinum til SMS frá [undirleiðaranum] stendur, at tey sum gerast Ver-kundar áðrenn 31. Juli, fáa eisini 100GB gávuna frá FT Samskifti.

399. Broytingin merkir, at gávan fer frá at verða eitt verjuátak til eitt beinleiðis álop á P/f Nema. Ein kundi hjá P/f Nema kundi í tíðarskeiðinum 25. apríl 2018 og fram til 31. juli 2018 skifta sítt 10GB Hey hald út við eitt 0GB Ver hald og hava 12,5 GB hvønn mánað at brúka fram til ársenda. Sami kundi kundi tann 1. januar 2019 skifta yviraftur til P/f Nema, tí gávan var givin nærmast treytaleyst.

400. Avgerðin av eisini at bjóða Hey kundum av gávuni, víkur fullkomiliga frá øllum tí, sum er farið fram undan fundinum í ovastu leiðsluni tann 24. apríl 2018. Øll uppskot um aftursvar hava higartil snúð seg um verandi kundar, og har gávan hevur inngingið, hevur tað altíð snúð seg um at keypa sær tíð til at koma við einum aftursvari. Aftaná fundin tann 24. Apríl, verður gávan fyrst broytt í støðd, síðani verður gildistíðin longd úr 30 døgum til 8 mánaðir og at enda verður hon broyt til eisini at verða rættað ímóti Hey-kundum.

401. Síðsta broytingin er rættiliga munandi og vísir, at endamálið við gávuni er broytt, tí tað er einum og hvørjum greitt, at P/f Nema nú varð tvungið til at koma við egnari gávu, annars mistu teir kundar.

402. Gávan gevur bara meining sum eitt vápn, ætlað at oyðileggja Datarull við, tí leiðslan í Føroya Tele hevur vitað, at P/f Nema fór at koma við eini líknandi gávu fyri at fasthalda kundar.

**Fríggjadagur, 27. apríl 2018**

| |
|---|
| Kl. 14:22 P/f Nema almannakunngerð á www.vp.fo, at allir verandi og nýggir kundar, sum koma áðrenn 31. juli 2018, fara at fáa eina gávu millum 100GB og 300GB. Støddin á gávuni verður ásett í mun til hvussu stór nøgd av data er á haldinum. Gávan hjá Nema er til haldið, t.v.s. til allar brúkarar í haldinum at deilast um.[117] |
| Kl. 14:39 [Deildarstjórin] sendur teldupost til [persónar í ovastu leiðslu] við kunning um gávuna hjá P/f Nema.[118] |

[117] P/f Nema (2018, apríl 27). "Stovningargáva til allar verandi og nýggjar Hey-kundar". Vágaportalurin. http://www.vp.fo/news/stovningargava-til-allar-verandi-og-nyggjar-hey-kundar
[118] KE-DE0011: Teldupostur sendur tann 27. apríl 2018, kl. 14:39, mailservari, brúkari: [....]

> Kl. 15:22 [Persónur í ovastu leiðslu] sendur teldupost til hinar um at tíðin nú var komin at bunta breiðband og fartelefoni saman í Ver.[119]
>
> Kl. 16:24 [Persónur í ovastu leiðslu] sendur teldupost til hinar, har hann spyr um aftursvarið hjá Føroya Tele skal koma í vikuskiftinum.[120]
>
> Kl. 16:46 [Deildarstjórin] sendur teldupost til hinar har hann svarar, at aftursvarið verður á skrá mánadagin, tí at P/f Nema nú hevði tikið lívið av síni datarull-tænastu.[121]

403. Longu 17 minuttir eftir at P/f Nema hevur almannakunngjørt, at felagið fer at geva øllum verandi og nýggjum kundum, sum koma áðrenn 31. juli 2018, eina gávu, eru viðkomandi persónar í evstu leiðsluni í Føroya Tele samtakinum kunnaðir.

404. Tað er serliga vert at leggja til merkis viðmerkingina hjá [deildarstjóranum] til spurninginum frá [persóni í ovastu leiðslu] um, hvørt svarast skuldi í vikuskiftinum. [Deildarstjórin] endar samskiftið við at siga, at eitt aftursvar kann bíða, tí P/f Nema nú hevði tikið lívið av Datarull.

405. Tað hevur týdning at hava í huga, at persónarnir, sum luttaka í samskiftinum henda dagin, eru persónar, sum virka innan sína vinnu. Talan er um persónar, sum hava holla vitan um fjarskiftisvinnuna.

406. Tað er ein sannroynd, at tá leiðslan í Føroya Tele 2-2½ tímar eftir at P/f Nema kom við síni gávu, kunnu koma til ta niðurstøðu, at hetta fór at taka lívið av Datarull, so var leiðslan í Føroya Tele fullgreið yvir, at tá hon broytti gávuna tveir dagar undan til eisini at fevna um nýggjar kundar, so fór hetta at oyðileggja Datarull.

### 3.4.2.2 Útihýsandi framferð í mun til P/f Nema

407. Tað er staðfest í evropeiskari rættarsiðvenju, at ein ráðandi fyritøka, sum roynir at ávirka strukturin á marknaðinum við øðrum amboðum enn teimum, sum eru vanlig í kapping, misnýtir sína ráðandi støðu.[122] Somuleiðis er staðfest í evropeiskari rættarsiðvenju, at ein ráðandi fyritøka hevur eina serliga skyldu til at tryggja, at hennara framferð ikki avlagar kappingina.[123]

408. Serliga skyldan merkir millum annað, at ráðandi fyritøkan kann verða avskorin frá framferð, sum í sær sjálvum ikki er misnýtsla og sum ikki var í stríð við kappingarlóggávu, um talan ikki júst var um eina marknaðarráðandi fyritøku[124] Tað er eisini staðfest í evropeiskari rættarsiðvenju, at ráðandi fyritøkur hava rætt til at verja síni handilsligu áhugamál[125], men at eitt aftursvar skal verða í lutfalli við ta hóttan sum er, og atlit skal takast til fíggjarligu fortreytirnar hjá kappingarneytanum.[126]

---

[119] KE-DE0010: Teldupostur sendur tann 27. apríl 2018, kl. 15:22, mailservari, brúkari: [....]
[120] KE-DE0010: Teldupostur sendur tann 27. apríl 2018, kl. 16:25, mailservari, brúkari: [....]
[121] KE-DE0011: Teldupsotur sendur tann 27. apríl 2018, kl. 16:25, mailservari, brúkari: [....]
[122] C-85/76 Hoffmann-La Roche, reglubrot 91
[123] C-322/81 Michelin (1), reglubrot 57
[124] T-340/03 France Télécom, reglubrot 186
[125] C-27/76 United Brands, reglubrot 189
[126] C-27/76 United Brands, reglubrot 190

409. Tað er vanligt, at fyritøkur royna at beina brúkaran burtur frá útboðnum hjá kappingarneytum og yvir til egið útboð. Hetta kann gerast við t.d. príslækkan, nýggjum vørum, menning av verandi vørum ella betri treytum.

410. Brúkarin fær ágóðan av slíkari kapping, tí henda kapping gevur støðugt betri útboð av vørum til betri treytir og prís.

411. Ein framferð, har ein ráðandi fyritøka velur at brúka og fíggja eina oyðilegging av útboðnum hjá kappingarneyta, er skaðiligt fyri kappingina og í síðsta enda fyri brúkaran.

412. Í hesum ítøkiliga førinum hevur ráðandi fyritøkan valt at fíggja eina gávu til allar kundar á marknaðinum í 8 mánaðir fyri at tryggja, at ein tænasta hjá einum kappingarneyta ikki skuldi fáa undirtøku.

413. Í tílíkum føri er gávan bert ein løtuvinningur fyri brúkaran og teir ágóðar, sum brúkarin annars vildi fingið frá kappingini fær brúkarin ikki. Heldur enn at fáa eyka data í eitt tíðarbil kundi brúkarin í óavmarkaða tíð fingið atgongd til at goyma óbrúkt dáta til næsta mánað og tær tænastur sum Føroya Tele arbeiddi við sum aftursvar til Datarull. Møguleikin at spara upp vildi veri eitt nýtt kappingarparametur og tí er ikki ósannlíkt at við tíðini vildi møguleikin at flyta millum familjulimir eisini komi.

414. Um ráðandi fyritøkan kann brúka sína fíggjarligu styrki til at oyðileggja átøk hjá kappingarneytanum, so vil ein líka effektivur kappingarneyti sum frá líður, geva upp við teirri avleiðing, at kappingin verður avmarkað til tað, sum ráðandi fyritøkan loyvir. Ein avleiðing kann eisini verða, at kappingarneytin hjá ráðandi fyritøkuni gevst á viðkomandi marknað.

415. Avleiðingin fyri brúkaran vil yvir tíð verða ein vælferðarmissur orsakað av manglandi prískapping, úrvali av vørum og vørumenning.

416. Avgerðin hjá Føroya Tele at lata gávuna til allar brúkarar á marknaðinum heldur enn at taka til tey amboð, sum eru vanlig í kapping, førdi til, at marknaðurin floymdi yvir av data í tíðarskeiðinum Datarull kom inn á marknaðin.

417. Gávan hevur tí avmarkaða undirtøkuna hjá Datarull á marknaðinum, tí flest allir kundar hava havt eina fyri teimum óavmarkað nøgd av data.

418. Ein framferð sum tann hjá Føroya Tele, hevur eisini sannlíkt havt langtíðar árin á kappingina millum feløgini.

419. Møguleikin hjá P/f Nema at fara í eitt størri prískríggj við P/f FT Samskifti fyri at vinna fleiri kundar, er avmarkaður, tí fíggjarliga megin hjá Føroya Tele samtakinum er somikið nógv størri, inntøkurnar frá fartelefoni hava størri týdning fyri P/f Nema.[127] Møguleikin hjá Føroya Tele at bunta tænastur, er eisini betur enn hjá P/f Nema.

420. P/f Nema var tó djarvt í 2018. Felagið kom við fleiri nýggjum átøkum Datarull, Bjóða við og Gev data. Ætlanin var at fáa fleiri kundar.

---

[127] sí part 2.2.1 og 2.2.2

421. Men Føroya Tele vísti greitt, at samtakið er til reiðar at átaka sær eitt búskaparlig tap, herundir at missa inntøkur, um P/f Nema kemur við eini tænastu, sum Føroya Tele ikki ynskir at føroyski brúkarin skal brúka.

422. Kappingareftirlitið metir framferðina vera útihýsandi mótvegis P/f Nema, ið hevði brúkt eina størri upphædd til menning og marknaðarføring við atliti til at vinna sær størri marknaðarpart, men sum í staðin kom í eina støðu, har felagið mátti rinda fyri egna data gávu fyri at standa ímóti.

423. Møguleikarnir hjá P/f Nema at kappast, eru tí rættuliga avmarkaðir, um felagið vil tryggja sær undan ikki at blíva kroyst meiri á marknaðinum.

424. Kappingareftirlitið metir framferðina hjá Føroya Tele at vera sera ógvusliga og als ikki í lutfalli við ta hóttan, sum felagið var undir. Hóttanin var ein ókeypis ískoytistænasta til haldini hjá kappingarneytanum, sum gav brúkaranum møguleika at spara upp óbrúkt data.

425. Sjálvsagt var ætlan at gera Hey-haldini meira áhugaverd og harvið vinna kundar, men tað er kapping, grundað á kappingarligar fyrimunir.

426. Aftursvarið hjá Føroya Tele var at floyma marknaðin við data í 8 mánaðir, og harvið átaka sær ein inntøkumiss uppá ½ mió. kr. og ein meirkostnað uppá 6,9 mió. kr.

#### 3.4.2.3 Útihýsandi framferð í mun til møguligar nýggjar kappingarneytar

427. Misnýtsla av marknaðarráðandi støðu er eitt objektivt hugtak[128]. Uttan mun til um avleiðingin av eini kappingaravlagandi framferð var tilætlað ella ikki, so er altíð talan um brot á § 11 í kappingarlógini.

428. Um tað mundi, tá gávan varð latin tann 24. apríl 2018, var Føroya Tele greitt yvir at nýggj fyritøka sannlíkt fór at koma inn á marknaðin.

429. Føroya Tele hevði árið undir verið í tingingum við felagið Sp/f Tosa um eina MVNO-avtalu. Hesar tingingar endaðu úrslitaleysar í september 2017.

430. Í byrjanini av 2018 vóru tankarnir hjá leiðslupersónum framvegis við Sp/f Tosa, hóast at tingingarnar vóru endaðar úrslitaleysar. Tann 10. januar 2018 sendur stjórin á P/f FT Samskifti teldupost til ovastu leiðslu í Føroya Tele við kunning um, at Sp/f Tosa lýsir á Facebook.[129]

431. Tann 8. mars 2018 verður framløga stovnað við heitinum "Upprit um tosa".[130] Tað framgongur av skjalinum, sum er goymt 11 ferðir seinasta 9. desember 2020 og samlaða viðgerðar tíðin er 2 tímar og 17 minuttir. Innihaldið av framløguni er um hvørja strategi Sp/f Tosa sannlíkt fer at hava og hvørja ávirkan hetta kann koma at hava á Føroya Tele.

432. Í framløgu í sambandi við nevndarfund í Føroya Tele tann 30. august 2018, er kappingarstøðan eisini viðgjørd, og her verður aftur víst til møguleikan fyri at nýggjar fyritøkur koma inn á marknaðin. Í framløguni verður m.a. ítøkiliga víst á Sp/f Tosa.[131]

---

128 C-85/76 Hoffmann-La Roche, reglubrot 91
129 KE-DE0012: Teldupost, 10. januar 2018, kl. 15:38, brúkari: [....]
130 KE-DE005: Power Point, Heiti: "Upprit um tosa", stødd: 2.253.371 byte
131 KE-DE0011: Power Point, heiti: "Board Meeting August 30, 2017 (Vision 2025), stødd: 395.651.745 byte

433. Føroya Tele hevur eisini árið fyri vent sær til ráðgeva fyri at fáa vegleiðing um hvussu ein møguligur MVNO'ari skal handfarast og eisini hvussu eftirlitsmyndugleikin skal handfarast, soleiðis at Føroya Tele kemur væl frá teimum marknaðarbroytingum, sum vóru ávegis.[132],[133]

434. Tað er tí greitt, at leiðslan í Føroya Tele er varug við, at møguleikin er til staðar fyri at viðkomandi fyritøka kann koma inn á marknaðin í næstum. Nýtslan er alsamt økt og innrásin við tólneti fer eisini at økja eftirspurningin í framtíðini, so tað er vandi fyri aðrar fyritøkur fara at vilja trína inn á marknaðin í næstum.

435. Hvørt gávan hevði sum endamál at styggja Sp/f Tosa og aðrar fyritøkur frá at stíga inn á viðkomandi marknað, so var avleiðingin av gávuni, at tað var óráð at trína inn á marknaðin frá 24. apríl 2018 til 31. desember 2018.

436. Tað sum eyðkennir viðkomandi marknað er at tala og sms eru óavmarkað, meðan nøgd av data ávirkar prísin. Í tíðarskeiðinum gávan var í gildi, høvdu flest allir brúkarar eina yvirflóð av data.

437. Undir tílíkum umstøðum vil ein veitari, sum hevur kappingarførar prísir, og er sinnaður at lata eina uppaftur størri gávu enn hana hjá Føroya Tele, framvegis hava torført við at fáa kundar, tí flest allir brúkarar hava ríkiligt av data og kunna tí ikki lokkast við meira data.

438. Kappingareftirlitið metir tí, at gávan hevði ta avleiðing at lokað marknaðin í tíðarskeiðinum apríl 2018 til desember 2018.

439. Kappingareftirlitið metir eisini, at gávan eisini hevur havt langtíðaravleiðingar fyri atgongdina til marknaðin. Tí talan var um eina serliga ógvusliga framferð, har Føroya Tele visti, at um aðrir á marknaðinum ikki fara fram, sum felagið ynskir, er man til reiðar bæði at frásiga sær inntøkur[134] og átaka sær kostnað[135] fyri at raka viðkomandi felag.

### 3.4.2.4 Ávegis niðurstøða

440. Kappingareftirlitið metir, at framferðin hjá Føroya Tele var útihýsandi framferð, sum var til skaða fyri kappingina og tí stríð við § 11 í kappingarlógini.

441. Kappingareftirlitið metir, at framferðin var egnað og sannlíkt hevur skaðað kappingina á viðkomandi marknað.

442. Í hesum sambandi skal havast í huga, at misnýtsla av ráðandi støðu noyðist ikki neyðturviliga at vera tilætlað.[136] Tað áleggur eini ráðandi fyritøku ein serlig skylda til ikki við síni framferð at skaða kappingina.[137] Skyldan merkir millum annað, at ráðandi fyritøkan, tá hennara handilsligu áhugamál verða hótt, skal tryggja sær, at aftursvarið er í lutfalli við hóttanina, harundir fíggjarligu støðuna hjá kappingarneytanum.[138]

---

132 KE-DE0012: Teldupostur, 5. februar 2017, kl. 22:41, brúkari [....]
133 KE-DE0012: Teldupostur, 5. februar 2017, kl. 22:50, brúkari [....]
134 sí part 3.4.1.4
135 sí part 3.4.1.4
136 C-85/76 Hoffmann-La Roche, reglubrot 91
137 C-322/81 Michelin (1), reglubrot 57
138 C-27/76 United Brand, reglubrot 189 og 190

443. Kappingareftirlitið metir, at P/f FT Samskifti hevur ikki yvirhildið ta serligu skyldu, sum er áløgd eini ráðandi fyritøku. Í hesum sambandi skal serliga havast í huga, at aftursvarið hjá P/f FT Samskifti, ikki var grundað á kappingarligar fyrimunir, men á fíggjarligu megina hjá felagnum og tí støðu á marknaðinum, sum felagið hevur arvað frá gamla lógarmonopolinum Telefonverk Føroya Løgtings.

444. P/f Nema valdi tann 18. apríl at gera broytingar í sínum vøruúrvalið við tí endamáli at tekkjast fleiri brúkarum. Hetta var at taka tey amboð í brúk, sum eru vanlig í kapping.

445. Aftursvarið hjá Føroya Tele var at fíggja eina tilgongd, sum skuldi yvirflóyma marknaðin við ókeypis data fyri at tryggja, at ein ókeypis ískoytistænasta hjá kappingarneytanum, ikki fekk undirtøku millum brúkarar. Talan var um eina framferð, har onnur amboð enn tey, sum eru vanlig í kapping, vórðu tikin í brúk.

446. Framferðin hjá Føroya Tele hevur sannlíkt eisini langtíðar avleiðingar fyri marknaðin. Hóast serlóggávan á økinum stuðlar, at nýggj feløg skulu hava lætt við at koma inn á marknaðin, so má ein og hvør, sum ætlar at trína inn á marknaðin, taka við í síni váðameting hvussu langt Føroya Tele er til reiðar at fara, um felagið sær eina hóttan í onkrum.

# 4 Niðurstøða

447. Kappingareftirlitið er komið til hesar niðurstøður:

1. Føroya Tele hevur ikki framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini við at selja til undir kostnað (ránsprísáseting/predatory pricing)
2. Føroya Tele hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini í sambandi við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018. Heldur enn at koma við einum aftursvari, sum var grundað á kappingarligar fyrimunir, so var aftursvarið grundað á fíggjarligu megina og ta ráðandi støðu, sum felagið hevur á marknaðinum.
3. Føroya Tele hevur framt brot á § 11, stk. 1 í kappingarlógini í sambandi við sítt aftursvar tann 25. apríl 2018, tí aftursvarið hevði ta avleiðing at steingja marknaðin í 8 mánaðir og ta langtíðar avleiðing at gera atgongdina til viðkomandi marknað torførari í framtíðini.

## 4.1 Kæruvegleiðing

448. Henda avgerð kann innan 4 vikur eftir móttøku av hesum skrivi kærast til Føroya Kærustovn, Undir Hornabakka, postsmoga 45, FO-110 Tórshavn, sbrt. §28, stk. 2 í kappingarlógini.

449. Viðvíkjandi kærum verður annars víst til kapittul 8 í kappingarlógini.

Vegna Kappingareftirlitið

Heri Joensen
formaður

Terje Sigurðsson
deildarstjóri